# *Á rættari kós*

**B Ú S K A P A R F R Á G R E I Ð I N G I**

mars 2013

Fíggjarmálaráðið

Fyrivarni verður tikið fyri villum.

Búskaparfrágreiðing I, mars 2013

© 2013, Fíggjarmálaráðið
Uppseting: Fíggjarmálaráðið
Útgávan kann takast niður frá www.fmr.fo.

# INNIHALDSYVIRLIT

1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS ........ 7

2. INNGANGUR ........ 9

3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN ........ 11

4. FØROYSKI BÚSKAPURIN ........ 13
4.1 Konjunkturgongdin ........ 13
4.2 Arbeiðsloysið ........ 14
4.3 Føroyska vinnan ........ 15
4.4 Føroysku húsarhaldini ........ 18
4.5 Tað almenna ........ 18
4.6 Gjalds- og handilsjavni ........ 19
4.7 Útlit fyri føroyska búskapin ........ 20
4.8 Avbjóðingar fyri føroyska búskapin ........ 21

5. KARMAFORTREYTIR ........ 23
5.1 Høvuðsfortreytin við uppskotinum til játtanarkarmar 2014-2018 ........ 23
5.2 Fortreytir fyri útreiðsluframskrivingunum 2014-2018 ........ 23
5.3 Fortreytir fyri inntøkuframskrivingunum 2014-2018 ........ 23

6. FRAMSKRIVINGAR ........ 25

7. TILTØK 2014-2018 ........ 27

8. LØGUR 2014-2018 ........ 29

9. RLÚ-ÚRSLIT 2014-2018 ........ 31

APPENDIKS 1: FRAMSKRIVINGAR ........ 33
§ 1 Løgtingið ........ 33
§ 2 Løgmansfyrisitingin ........ 34
§ 3 Fíggjarmál ........ 35
§ 5 Fiskivinnumál ........ 37
§ 6 Vinnumál ........ 38
§ 7 Mentamál ........ 40
§ 11 Heilsumál ........ 42
§ 12 Almannamál ........ 44
§ 15 Innlendismál ........ 48
§ 20 Inntøkur ........ 49

APPENDIKS 2: RAKSTRAR- OG INNTØKUTILTØK ..... 53
§ 2 Løgmansfyrisitingin ..... 53
1. Rakstrartillagingar ..... 53
2. Alment innkeyp ..... 54
3. Savna miðfyrisitingina ..... 54
§ 3 Fíggjarmál ..... 55
1. Rentustuðul lækkast til 30% í 2018 ..... 55
2. Alment innkeyp ..... 56
3. Effektivisering hjá TAKS ..... 56
4. Útgjaldsskipan ..... 57
5. Útveitan ..... 58
§ 5 Fiskivinnumál ..... 59
1. Fiskiveiðieftirlitið, MRCC og Tilbúgvingarstovnurin verða løgd saman. ..... 59
2. Meirinntøkur á Havstovuna ..... 60
3. Effektivisering av innkeypi ..... 60
4. Uttanhýsis fígging av landbúnaðargransking ..... 61
5. Effektivisering og automatisering av umsitingini av fiskiloyvum ..... 61
6. Uttanhýsis fígging av fiskivinnugransking ..... 62
7. Leiga havrannsóknarskip ..... 62
8. Alment innkeyp ..... 63
§ 6 Vinnumál ..... 64
1. Jarðfeingi ..... 64
2. Miðsavnan av rakstrinum av skipaflotanum hjá landinum(“landsreiðarí”) ..... 64
3. Strandfaraskip Landsins ..... 65
4. Nýggj nólsoyarferja ..... 65
5. Minking í stuðulsskipanum ..... 65
6. Alment innkeyp ..... 65
§ 7 Mentamál ..... 67
1. Fólkaskúlaøkið ..... 67
2. Miðnámsútbúgvingaøkið ..... 68
3. Hægri útbúgvingar og gransking ..... 69
4. Lestrarstuðulsskipanin ..... 69
5. Mentunarstuðul ..... 70
6. Annað og alment innkeyp ..... 70
7. Stuðul til oyggjaleikir/ítróttur ..... 70
§ 11 Heilsumál ..... 72
1. Umlegging av virkseminum í heilsuverkinum ..... 72
2. Samanlegging av stovnum á primera heilsuøkinum ..... 73
3. Heilsutrygdarveitingar ..... 73
4. Ílegusavnið, eginfíggjaður rakstur ..... 74
5. Heilivágsframleiðsluútflutningur ..... 74
6. Alment innkeyp ..... 75
§ 12 Almannamál ..... 76
1. Fólkapensjón: Pensjónsnýskipan ..... 76
2. Sparingar innan rakstrarjáttanir og sparing innanfyri Serforsorg ..... 77
3. Alment innkeyp ..... 77
§ 15 Innlendismál ..... 78
1. Landsins ognir ..... 78

2. Tillagingar í rakstri og stuðlum........79
3. Alment innkeyp........79
§ 20 Inntøkur........80
1. Eykaskattur á fiski- og alivinnu........80
2. Hægri fráfaringaraldur hjá landinum........81
3. Bøtur........82
4. Heildarveiting........82

APPENDIKS 3: Løgur 2014-2024........83
§ 1 Løgtingið........83
§ 2 Løgmansfyrisitingin........83
§ 3 Fíggjarmálaráðið........83
§ 5 Fiskivinnumál........83
§ 6 Vinnumál........83
§ 11 Heilsumálaráðið........84
§ 12 Almannamálaráðið........85
§ 15 Innlendismál........85

# 1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS

Framgongd og vøkstur eru høvuðsmál hjá Landsstýrinum, og greiðar ábendingar eru um, at framgongd hevur verið í føroyska búskapinum seinastu tvey árini.

Lønargjaldingarnar eru vaksandi og størri enn nakrantíð. Løntakaratalið veksur, og støðug minking hevur verið í arbeiðsloysinum í meira enn tvey ár. Árstíðarjavnaða arbeiðsloysið er nú undir 5 prosent. Hetta verður í flestu londum mett at vera lágt. Men, hetta er tó størri enn tað, sum kann sigast at vera vanligt í Føroyum, so rúm er fyri meiri framgongd.

Hóast støðan er batnað, so kann ikki sigast, at bjartskygni valdar allastaðni. Føroyingar eru fíggarliga varnir, og hetta ávirkar búskapin og sostatt eisini almennu inntøkurnar. Ábendingar eru tó um, at fólk eru vorðin bjartskygdari, tá ið tey hyggja frameftir.

Fíggjarkreppan, sum rakti okkum so brádliga – og dyggiliga – fyri 5 árum síðan, sær út til at hæsa av her hjá okkum. Soleiðis er tó ikki allastaðni. Hóast glottar eru, valdar framvegis óvissa nógvastaðni, og í fleiri londum eru útlitini rættiliga døpur.

Ein av stóru orsøkunum til skuldarkreppuna í fleiri londum er vantandi politiskur vilji til at fremja neyðugar bygnaðarbroytingar í rættari tíð. Hesi lond drógust longu áðrenn fíggjarkreppuna við bygnaðarligar trupulleikar, m.a. almenn hall. Trupulleikar, sum sluppu at vera óloystir, og sum í dag hava vaksið seg ovurhonds stórar. Hetta má ikki henda her hjá okkum.

Føroyar hava sínar bygnaðarligu trupulleikar, og teir mugu – og skulu – loysast.

Til tess at fáa avlop aftur á fíggjarlógina í 2016 skulu nýskipanir fremjast komandi 5 árini. Í uppskotinum til játtanarkarmar hevur Landsstýrið m.a. uppskot um heilsunýskipan og skúlanýskipan. Eisini skal pensjónsnýskipanin setast í verk, og nýggja eftirlønarlógin er longu borin í Tingið. Hesar nýskipanir eru neyðugar fyri at framtíðartryggja okkum høgt tænastustøði fyri lægri kostnað. Eisini skal gerast fiskivinnunýskipan, sum gevur vinnuni tryggari og varandi karmar, og sum eisini gevur landsskassanum fleiri inntøkur. Viðvíkjandi trupulleikanum við fráflyting hevur Landsstýrið sett ein bólk at koma við ítøkiligum tilmælum um, hvat kann gerast fyri at venda gongdini.

Løgukarmurin hækkar næstan 70 mió. kr. í 2014. Hetta hevur sjálvandi við sær, at RLÚ-hallið økist, men hetta verður mett at verða ein neyðug raðfesting. Endamálið er eisini at tryggja virksemi í samfelagnum.

Tikið verður sum givið, at miðfyrisitingin sjálv eigur at ganga á odda í sambandi við rationaliseringar. Í langtíðarhøpi verður roknað við munandi sparingum í sambandi við miðsavning av miðfyrisitingini.

Hildið verður fram við rationaliseringum á øllum teimum økjum, har hetta verður mett møguligt. Endamálið er alla tíðina at fáa tað sama fyri minni. Sum dømi kann nevnast, at farið verður nú undir at miðsavna útgjaldsskipanir landsins.

Landsstýrið metir, at útveitan av almennum uppgávum er ein leið sum í størri mun eigur at verða roynd í Føroyum. Farið verður undir eitt miðvíst kanningararbeiði í hesum sambandi, og roknað verður við, at hetta sum frálíður fer at hava munandi sparingar við sær.

Í hesi búskaparfrágreiðing eru øll tiltøk gjøllari greinað.

Hóast vit hava fingið tamarhald á almenna undirskotinum, so hava vit framvegis eitt bygnaðarligt hall á fíggjarlógini, og hetta má og skal burtur. Vit mugu fáa yvirskot aftur á fíggjarlógina, soleiðis at vit kunnu fara undir at rinda skuldina niður.

Vit mugu hava í huga, at høvuðsorsøkin til, at vit eru komin so væl gjøgnum fíggjarkreppuna, er tann, at vit høvdu ein skuldarfrían almennan geira, tá ið kreppan rakti. Vit kundu hava eitt ovurhonds stórt hall í fleiri ár, uttan at vit komu í eina skuldarkreppu.

Nú tekin eru um framgongd í búskapinum, er tíðin komin til at taka tey seinastu tøkini. Tað er lættari at fremja broytingar, tá ið búskaparliga rákið er við okkum, enn tá ið tað rekur í móti. Vit mugu ikki liggja sjóvarfallið av okkum.

Tað er við hesum í huga, at Landsstýrið leggur fram uppskot til játtanarkarmar, sum tryggjar yvirskot á fíggjarlógini í 2016.

Vit eru Á Rættari Kós!

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

# 2. INNGANGUR

Sambært § 8, stk. 2 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal ein frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran, leggjast við uppskotinum til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar. Uppskotið til løgtingssamtykt skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Skipanin við játtanarkarmum varð fyrstu ferð roynd fyri fíggjarárið 2011, og er hetta sostatt fjórða uppskotið til játtanarkarmar, ið verður lagt fram.

Frágreiðingin er sett saman soleiðis, at fyrst er ein stutt lýsing av gongdini í altjóða búskapinum og gongdini í ymiskum viðurskiftum, sum hava týdning fyri gongdina í føroyska búskapinum.

Síðani verða gongdin og útlitini fyri føroyska búskapin lýst við teirri vitan og teimum tølum, ið vóru tøk í mars 2013. Sum vanligt er talan um eina stutta frágreiðing, styttri enn tann, sum verður løgd fram í sambandi við fíggjarlógaruppskotið.

Eisini verður í stuttum sagt frá teimum høvuðsavbjóðingum, sum eru fyri føroyska búskapin, og hvussu samgongan ætlar at loysa hesar avbjóðingar.

Fortreytirnar fyri játtanarkørmunum verða harumframt lýstar, og síðani eru lýsingar av framskrivingum og tiltøkunum frá 2014 til 2018.

Sagt verður frá langtíðarløguætlanini frá 2014 til 2025.

At enda verður úrslitið (RLÚ) 2014-2018 útgreinað.

Framskrivingarnar, tiltøkini og langtíðarløguætlanin eru meira útgreinað í appendiks.

# 3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN

Altjóða búskapurin er framvegis ótryggur, men roknað verður kortini við, at búskapurin spakuliga fer at fóta sær komandi árini. Stígur er serliga komin í í framkomnum ídnaðarlondum, men vøksturin í menningarlondunum er eisini minni enn áður. Útlitini batnaðu nakað í triðja ársfjórðingi í 2012, tá BTÚ í heiminum øktist umleið 3% í mun til sama tíðarskeið í 2011. Orsøkin til betru útlitini var serliga, at gongdin í menningarlondunum var á leið sum roknað varð við, meðan vøksturin í USA var størri enn væntað.

**Talva 3.1: Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum í %, 2011-2014**

| *prosent* | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** |
|---|---|---|---|---|
| Heimsbúskapurin | 3,9 | 3,2 | 3,5 | 4,1 |
| Ídnaðarlond | 1,6 | 1,3 | 1,4 | 2,2 |
| Menningarlond | 6,3 | 5,1 | 5,5 | 5,9 |

*Kelda: IMF, World Economic Outlook - Update, January 23, 2013.*

Politisk tiltøk hava minkað um vandan fyri nýggjum kreppum í evruøkinum og í USA, men tað hevur kortini víst seg at taka longri tíð enn væntað at fáa búskapin í hesum londum aftur á beint. Búskapurin í Japan er í løtuni í enn einari resessión, men roknað verður við, at ymisk vakstrarátøk skjótt fara at skapa ein lítlan vøkstur í japanska búskapinum. Í summum menningarlondum er framvegis rímiliga stórur búskaparvøkstur, meðan verri stendur til í øðrum londum.

Í sínari nýggjastu meting[1] roknar altjóða gjaldoyragrunnurin IMF við, at heimsbúskapurin veksur 3,5% í 2013 og 4,1% í 2014. Talvan omanfyri vísir, at í ídnaðarlondunum verður samanlagt roknað við einum lítlum vøkstri á 1,4% í 2013 og 2,2% í 2014. Fyri menningarlondini er metingin ein vøkstur á 5,5% í 2013 og 5,9% í 2014.

Um tað slepst undan nýggjum kreppum, og fíggjarligu fyritreytirnar støðugt gerast betri, kann vøksturin í heimsbúskapinum gerast størri enn mett. Hinvegin er váðin fyri afturstigum framvegis stórur, m.a. orsakað av nýggjum kreppum, ið kunnu taka seg upp í evruøkinum og afturvendandi spurninginum um skuldarloftið í USA.

Eisini ES hevur kunngjørt sínar metingar fyri búskaparvøksturin í 2013 og 2014. Roknað verður við, at lítli vøksturin í 2012 heldur fram í 2013, men fer at økjast í 2014. Mett verður, at búskaparvøksturin í øllum samveldinum verður 0,1% í 2013 og 1,6% í 2014. Í teimum 17 evrulondunum verður tó roknað við einari afturgongd á 0,3% í 2013 og einari framgongd á 1,4% í 2014.

Arbeiðsloysið í ES verður framvegis høgt. Fyri alt ES verður roknað við einum arbeiðsloysi á umleið 11%, meðan tað fyri evrulondini helst kemur at liggja nakað omanfyri 12%. Fyri einstøku londini kann t.d. nevnast, at í Týsklandi er arbeiðsloysið 5,4%, í Stóra Bretlandi 7,8% og í Danmark

[1] World Economic Outlook – Update, January 23, 2013

7,9%. Í Spania og Grikkalandi er arbeiðsloysið heilt uppi á 26%, meðan nakað frægari stendur til í Frankaríki og Italia, har arbeiðsloysið er ávikavist 10,5% og 11,1%. Av øðrum ídnaðarlondum kunnu nevnast USA, har arbeiðsloysið nú er minkað til 7,8% og Japan, har arbeiðsloysið er minkað til 4,1%.

Búskaparkreppan og niðurgongdin í búskaparvøkstrinum ávirka framvegis fíggjarlógirnar í ymisku londunum. Í ES verður tó roknað við, at hetta batnar nakað móti endanum av 2014. Undirskotið í evruøkinum fellur væntandi úr 2,8% av BTÚ í 2013 til 2,7% í 2014. Fyri alt samveldið verður roknað við einum undirskoti á 3,4% í 2013 og 3,1% í 2014.

Yvirhøvur eru útlitini fyri heimsbúskapin næstu tvey árini framvegis óviss. Gongdin er m.a. treytað av, hvørt tað eydnast londunum í ES og øðrum ídnaðarlondum at fáa tamarhald á skuldarkreppuni. Bygnaðarbroytingar og tillagingar í fíggjarpolitikkinum, m.a. við herdum regluverki og meira samskipan av fíggjarpolitikkinum millum lond, eru neyðugar, skulu íleggjarar og fíggjarmarknaðir aftur fáa álit á rikna búskapar- og fíggjarpolitikkin.

Arbeitt hevur leingi verið við at finna loysnir og semjur í sambandi við hesar avbjóðingar, og meðan summi tiltøk eru samtykt og sett í verk, vantar framvegis at funnar verða meira varandi loysnir á øðrum spurningum, sum t.d. amerikanska skuldarloftinum.

Hóast útlitini í summum londum eru sera vánalig, kunnu vit tó samanumtikið rokna við, at altjóða búskapurin fer at vaksa spakuliga komandi árini. Mest í Kina, India og øðrum londum í Asia, men eisini eitt sindur í londum sum USA, Týsklandi og Stóra Bretlandi. Tað er tó ikki hugsandi, at vit skjótt aftur fara at síggja vøkstur í altjóða búskapinum, sum er á hædd við vøksturin áðrenn fíggjarkreppuna.

# 4. FØROYSKI BÚSKAPURIN

## 4.1 Konjunkturgongdin

Frá 2005 til 2007 var stór framgongd í føroyska búskapinum. Framgongdin helt eisini fram í 2008, men var tá kortini á lægri støði enn árini frammanundan. Í 2009 sá heimsbúskapurin heilt øðrvísi út enn árini framman undan, og hetta merktist eisini aftur í føroysku lønargjaldingunum, sum hetta árið bert vóru 6,7 mia. kr. Í mun til 2008, tá samlaðu lønargjaldingarnar vóru 7 mia. kr., var hetta ein minking á 4,5%, svarandi til góðar 300 mió. kr. Lutfalsliga var afturgongdin størst í bólkinum byggivinna og onnur tilvirking, har lønargaldingarnar minkaðu við 13,3% og í bólkinum fiskivinna og onnur ráevnisvinna, har lønargjaldingarnar minkaðu við 11,7%. Lønargjaldingarnar í bólkinum privatar tænastuvinnur lækkaðu við 5,6%, og hóast lønargjaldingar í sambandi við almennar tænastur øktust við 4,2%, mugu vit kortini ásanna, at broytingin frá 2008 til 2009 var eitt skrædl. Samstundis kunnu vit tó gleðast um, at vit eisini náddu botnin longu í 2009, og at tað síðan tá aftur hevur gingið framá í føroyska búskapinum. Hetta sæst best aftur í samlaðu lønargjaldingunum[2], sí talvu 4.1.

**Talva 4.1: Lønargjaldingar í mió. kr. býttar á høvuðsvinnur, 2009-2012**

| *mió. kr.* | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | **Munur 2011-2012** í mió. kr. | **Munur 2011-2012** prosent |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskivinna o.o. ráevnisvinna | 1.096 | 1.250 | 1.286 | 1.354 | 68 | 5,0 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 878 | 821 | 827 | 839 | 12 | 1,4 |
| Privatar tænastuvinnur | 2.288 | 2.244 | 2.216 | 2.324 | 109 | 4,7 |
| Almennar tænastur | 2.440 | 2.486 | 2.524 | 2.561 | 37 | 1,5 |
| **Samlaðu lønargjaldingarnar** | **6.701** | **6.801** | **6.852** | **7.078** | **225** | **3,2** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í 2010 og 2011 var samlaði vøksturin í lønargjaldingum tó lutfalsliga lítil og útgoldna upphæddin kom ikki heilt upp á sama støði sum í 2008. Í 2012 øktust lønargjaldingarnar triðja árið á rað, og nominelt er samlaða upphæddin nú eitt vet hægri enn í 2008. Í 2012 vóru goldnar 7.078 mió. kr. í lønum, og var hetta 225 mió. kr. ella 3,2% meira enn í 2011.

Fyrstu tveir mánaðirnar í ár eru samlaðu lønargjaldingarnar eitt vet størri enn fyri sama tíðarskeið í 2012, sí talvu 4.2. Ein lítil vøkstur er í privatu tænastuvinnunum, meðan ein lítil minking er í bólkunum fiskivinna og onnur ráevnisvinna, og byggivinna og onnur tilvirking. Lønargjaldingar fyri almennar tænastur eru øktar við 29 mió. kr., ið svarar til eina hækking á 7,3% í mun til 2012. Her eigur tó at havast í huga, at orsakað av pedagogverkfallinum í februar 2012, vóru

[2] Føroysku lønargjaldingarnar eru omanfyri 50% av BTÚ og tí geva lønargjaldingarnar eina góða ábending um gongdina í virkseminum í føroyska búskapinum.

lønargjaldingarnar fyri almennar tænastur umleið 11 mió. kr. minni henda mánaðin, enn tær annars høvdu verið. Um hetta verður tikið við, var vøksturin í hesum bólki bert 18 mió. kr., ið hevði svarað til umleið 4,5%.

Samlaðu lønargjaldingarnar fyrstu tveir mánaðirnar í ár vóru 1.107 mió. kr., ið er 31 mió. kr. hægri enn fyri sama tíðarskeið í 2012.

**Talva 4.2: Lønargjaldingar í mió. kr. býttar á høvuðsvinnur, januar-februar**

| | | | | | **Munur 2012-2013** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *mió. kr.* | **2010** | **2011** | **2012** | **2013** | **í mió. kr.** | **prosent** |
| Fiskivinna o.o. ráevnisvinna | 174 | 155 | 191 | 190 | -1 | -0,6 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 122 | 124 | 129 | 127 | -2 | -1,2 |
| Privatar tænastuvinnur | 341 | 339 | 363 | 368 | 5 | 1,5 |
| Almennar tænastur | 394 | 403 | 393 | 421 | 29 | 7,3 |
| **Samlaðu lønargjaldingarnar** | **1.031** | **1.020** | **1.075** | **1.107** | **31** | **2,9** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

## 4.2 Arbeiðsloysið

Arbeiðsloysið var vaksandi gjøgnum alt 2009 og fyrstu mánaðirnar av 2010. Í mai 2010 minkaði arbeiðsloysið fyri fyrstu ferð síðan november 2008. Eftir húsagangin hjá Fiskavirking hækkaði arbeiðsloysið við árslok 2010 og var í hæddini í februar 2011, tá ið tað var 7,9%. Síðani tá hevur trendurin í arbeiðsloysinum verið fallandi og við árslok 2012 var arbeiðsloysið uppgjørt til 5,0% av arbeiðsfjøldini. Henda uppgerð vísti tað sama í januar í ár, sí mynd 4.1.

Tað árstíðarjavnaða arbeiðsloysið minkaði úr 4,9% í desember til 4,7% í januar, ið er tað minsta síðani august 2009.[3]

[3] Uppgerð hjá Hagstovu Føroya pr. 13/3-13

**Mynd 4.1: Føroyska arbeiðsloysisprosentið, januar 2009 til januar 2013.**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

## 4.3 Føroyska vinnan

Føroyska vinnan kann býtast upp í vinnur, sum fyri mesta partin fáast við útflutning, og vinnur, sum fyri mesta partin liva av heimliga eftirspurninginum. Vinnurnar, ið umboða útflutningssíðuna í føroyska búskapinum, eru í høvuðsheitinum fiskivinnan og aðrar tilfeingis- og ídnaðarvinnur. Vinnurnar, ið liva av heimliga eftirspurninginum, eru í høvuðsheitinum vinnur, ið fáast við handils-, tænastu- og byggivirksemi.

Føroyska fiskivinnan kann býtast upp í botnfiskaveiði undir Føroyum, botnfiskaveiði á fjarleiðum, fiskiveiði eftir uppisjóvarfiski og alivinnu, sum allar virka undir ymsum fortreytum til ymsar tíðir.

**Botnfiskaveiðan undir Føroyum** er minkað munandi seinnu árini og er framvegis á einum lágum støði. Í 2012 lá nøgdin um 56.000 tons, ið er nærum sama nøgd sum í 2011. Samanborið við onnur ár, svarar hetta t.d. bara til tríggjar fjórðingar av botnfiskaveiðuni í 2010 og minni enn helvtina av veiðuni í 2002 og 2003. Ringast sær út við veiðuni av toski og hýsu, ið heldur áfram at minka, meðan upsaveiðan, sum hevur verið minkandi í nøkur ár, øktist nakað aftur í 2012.

Hóast nøgdirnar vóru eitt vet hægri í 2012 enn í 2011, er veiðuvirðið av botnfiskinum minkað nakað í 2012. Veiðuvirðið var 603 mió. kr. í 2011, meðan tað var 579 mió. kr. í 2012. Størstu orsakirnar til lækkingina er, at prísirnir á toski og upsa eru lækkaðir nakað í mun til 2011. Samanborið við onnur ár er virðið á botnfiskaveiðuni undir Føroyum 4% minni enn í 2011, 15% minni enn í 2010 og helvtina minni enn í 2002, sum var tað higartil besta árið. Sum útlitini eru í løtuni, er einki, ið bendir á, at gongdin í botnfiskaveiðuni undir Føroyum broytist munandi í 2013.

Viðvíkjandi **botnfiskaveiðuni á fjarleiðum** eru útlit fyri, at framleiðslan í hesum partinum av flotanum veksur í nøgd í mun til 2012. Samlaðu føroysku toska- og hýsukvoturnar í russiskum sjógvi eru 28% hægri í 2013 samanborið við 2012. Prísirnir á hesum vørum hava tó verið fallandi í

seinastuni, men eru møguliga við at rætta seg upp aftur nú. Tí er torført at siga, hvørja ávirkan hetta fær á samlaða veiðuvirðið fyri árið, men sum útlitini eru í løtuni, verður veiðuvirðið helst á sama støði sum í 2012. Orsakað av makrelósemjuni verður heldur ikki nakar fiskiskapur hjá føroyskum skipum í norskum sjógvi í ár.

Framleiðslan í **uppisjóvarvinnuni** var nakað minni í 2012 enn í 2011, ið var eitt gott ár hjá hesum partinum av flotanum. Makrelfiskiskapurin í 2012 var 107.000 tons í mun til góð 120.000 tons í 2011. Strandalondini eru framvegis ósamd um, hvussu makrelkvoturnar skulu býtast frameftir, og tí koma Føroyar helst aftur í ár at áseta sær sína egnu makrelkvotu. Kvotan verður helst lækkað eftir tilráðing frá ICES, men íroknað ófiskaðu kvoturnar í fjør, verður helst møguleiki at fiska umleið 130.000 tons av makreli í 2013. Svartakjaftakvoturnar til nótaskip og ídnaðarskip tvífaldast í 2013 í mun til 2012, og fer hetta helst at gera góðan mun hjá skipunum. Óvissa valdar enn um sildabýtið, og her koma Føroyar eisini at áseta sína egnu kvotu. Samanumtikið kunnu vit rokna við, at nøgdirnar, ið uppisjóvarvinnan kann fiska í 2013, verða størri enn í 2012. Verri er at siga nakað um prísin, men um hesin ikki fellur, kemur henda vinna helst at muna meir í búskapinum í 2013 enn í 2012.

**Alivinnan** setti framleiðslumet í 2012, tá tøkan í kruvdari vekt var næstan 63.000 tons. Samanborið við sløk 50.000 tons í 2011 var talan um ein vøkstur í framleiðsluni uppá umleið 26 prosent. Prísurin á laksi var tó nakað lakari í 2012 enn í 2011 og tí varð vøksturin í søluvirðinum lutfalsliga ikki líka stórur sum í framleiðslunøgdini. Útflutningsvirðið á laksi var 1,8 mia. kr. í 2012, sum er umleið 12% hægri enn í 2011, tá útflutningsvirðið var 1,6 mia. kr. Útlit eru fyri, at útflutningsvirðið í alivinnuni eisini hækkar nakað í 2013 samanborið við 2012. Grundgevingin fyri hesum er, at tøkan mest sannlíkt verður á leið tann sama sum í 2012, samstundis sum útlit eru fyri, at prísirnir fara at vera á einum hægri støði enn í 2012.

Samanumtikið verður **samlaða framleiðslan í fiskivinnuni** helst størri í 2013 enn í 2012. Høgi oljuprísurin tyngir munandi um raksturin og vaksandi oljuprísir eru ein hóttan, sum kann fáa munandi ávirkan á úrslitið hjá øllum flotanum. Listaprísurin á gassolju til skip hevur í 2012 sveiggjað um 6 kr. fyri ein litur og liggur í løtuni beint omanfyri 6 kr. Útlit eru ikki til at oljuprísurin lækkar, men hinvegin er heldur einki ítøkiligt, ið bendir á, at hann hækkar munandi komandi mánaðirnar.

Við fyrivarni fyri prísbroytingum koma fiskivinnurnar samanlagt helst at geva eitt størri ískoyti til BTÚ í 2013 enn í 2012. Tó verður mett, at framleiðslan í fiskivinnuni á landi verður á leið tann sama í 2013 sum í 2012, og talið av løntakarum fer væntandi eisini at vera áleið tað sama sum í 2012.

Av heimligu vinnunum er **byggivinnan** tann vinnugreinin, sum hevur sveiggjað mest tey seinastu árini. Sera nógv virksemi var í byggivinnuni í 2008, áðrenn tað byrjaði at ganga afturá í føroyska búskapinum. Afturgongdin rakti tó byggivinnuna sera meint, og í fjør vóru lønargjaldingarnar í byggivinnuni framvegis næstan ein fjórðing lægri enn í 2008. Sama ger seg galdandi fyri talið av løntakarum, ið nú eru eini 600 færri enn í 2008.

Byggivinnan kann býtast upp í byggifyritøkur, sum serliga fáast við størri byggiverkætlanir og smærri fyritøkur, sum serliga fáast við húsasmíð og aðrar smærri byggiverkætlanir.

Síðstu árini hevur virksemið hjá smærru fyritøkunum verið rímiliga støðugt. Arbeiði hevur m.a. fevnt um umvælingar av stormskaðum, aðrar umvælingar og smærri um- og útbyggingar. Nakað av eyka virksemi var skapt í sambandi við at lógin um endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við bygging og umvæling av egnum bústaði, fór úr gildi 1. januar í fjør. Hinvegin hevur óvissa valdað um nakrar av teimum størru verkætlanunum, sum tí í ávísan mun eru broyttar og útsettar. Kendasta verkætlanin í hesum sambandi er bygging av nýggjum miðnámsdepli í Marknagili í Havn. Aðrar størri verkætlanir, ið eru í gerð, ella ætlanin er at fara undir, eru t.d. terminalurin á flogvøllinum, útbygging av vatnorkuni hjá SEV, nýggjur skúli á Giljanesi, útbygging og dagføring av miðnámskúlunum í Eysturoynni og í Klaksvík, nýtt ellis- og røktarheim í Klaksvík, fimleikahøll í Runavík, musikkskúli og íbúðir til sinnisveik í Tórshavn, nýggj brúgv um Sandá í Tórshavn, nýtt hús til Havnar Arbeiðsmannafelag, nýtt vinnuhús, Saltsiloin á Tvøroyri, útbygging av Varðin Pelagic á Tvøroyri, útbygging av smoltstøðini hjá Bakkafrost á Norðtoftum og depil í Runavík fyri fjølbrekað børn. Nevnast kann eisini, at arbeiði at gera tunnil til Viðareiði væntandi verður boðið út í næstum og at stór útbygging av Landssjúkrahúsinum stendur fyri framman.

Seinasta árið er treystitalið fyri byggivinnuna farið úr -32 upp í 17.[4] Treystitalið fyri byggivinnuna hevur annars verið negativt síðan 2008, tó við einum undantaki.

Heimligu **handils- og tænastuvinnurnar** merkja framvegis lága eftirspurningin eftir vørum og tænastum. Tað er serliga sølan av drúgvum nýtsluvørum og ymsum tænastuveitingum, sum er væl minni nú enn fyri nøkrum árum síðan. Sølan av ódrúgvum nýtsluvørum er ikki minkað eins nógv.

Treystitølini í konjunkturbarometrinum fyri januar vísa tó framgongd bæði hjá handils- og tænastuvinnuni. Eftir at hava ligið um nullpunktið í januar og juni 2012 er treystitalið hjá handilsvinnunum farið upp í 16 í januar í ár. Tað er serliga økta sølan í seinnu helvt av 2012, sum er orsøk til hesa hækking. Treystitalið hjá tænastuvinnunum er farið úr 9 upp í 37 frá januar 2012 til januar í ár. Hetta kemst serliga av, at eftirspurningurin í tænastuvinnuni er øktur hetta seinasta árið, og tænastufyritøkur siga seg tí hava merkt stóra framgongd seinastu 12 mánaðirnar.

Stórar broytingar hava verið í **føroyska fíggjargeiranum** seinastu árini. Eik samtakið fór á húsagang á heysti 2010, og endurstovnaði Eik-bankin er givin við virkseminum uttanlands. BankNordik hevur harafturímóti økt um virksemið uttanlands. Størsti parturin av kundunum hjá BankNordik eru nú í Danmark.

Mett verður ikki, at nøkur kredittklemma eyðkennir føroyska fíggjargeiran í løtuni. Eftirspurningurin eftir fígging er harafturímóti lítil. Hetta tyngir raksturin og leggur trýst á vinningin hjá bankunum.

Av føroysku peningastovnunum eru tað higartil bara Bank Nordik og Eik Banki, ið hava kunngjørt ársúrslitið fyri 2012. Áðrenn skatt vóru úrslitini hjá hesum báðum peningastovnum ávikavist 121 og 94 mió. kr. Roknað verður eisini við, at hinir føroysku peningastovnarnir hava rímilig úrslit fyri 2012, og at 2013 helst verður eitt gott ár hjá peningastovnunum. Henda meting byggir á, at tapini helst verða avmarkað og at nógv hevur verið gjørt fyri at bøta um raksturin. Hinvegin merkja peningastovnarnir framvegis, at kundarnir eru varnir við at brúka og læna pengar. Hetta merkir m.a., at tað ikki verður roknað við nøkrum serligum vøkstri í útlánum.

[4] Konjunkturbarometrið fyri januar 2013.

## 4.4 Føroysku húsarhaldini

Yvir helmingurin av allari nýtslu í Føroyum stavar frá húsarhaldunum. Tí hevur eftirspurningurin hjá húsarhaldunum nógv at týða fyri virksemið hjá vinnunum, ið liva av heimliga eftirspurninginum. Nýtsluatferðin hjá húsarhaldunum er nógv ávirkað av ymiskum signalum og hendingum í samfelagnum.

Tað eru fleiri viðurskifti, sum hava ávirkað nýtsluatferðina hjá føroysku brúkarunum skeiva vegin seinastu árini. Nevnast kunnu t.d. alheims fíggjar- og skuldarkreppan, víkjandi fiskastovnar, høgir oljuprísir og húsagangirnir hjá Eik og Fiskavirking. Slíkar hendingar gera privatu húsarhaldini ótrygg, og tey velja at minka um nýtsluna og økja um uppsparingina ella gjalda skuld niður. Nýtslan hjá føroysku húsarhaldunum var í hæddini í 2007, men minkaði nógv í 2008 og 2009. Aftaná stóru niðurgongdina hevur innflutningurin til beinleiðis nýtslu verið á einum spakuliga vaksandi støði. Tað er tó serliga innflutningsvirðið á mati og drykkjuvørum, ið er hækkað, og er orsøkin helst í stóran mun hægri prísir á hesum vørum. Innflutningsvirðið á persónbilum er eisini hækkað aftur seinnu árini. Frá 2011 til 2012 øktist innflutningurin av persónbilum við gott 50 mió. kr., ið svarar til eina hækking á sløk 50%.

2012 var fyrsta árið við nýggju flatskattaskipanini, ið mett var fór at geva føroysku húsarhaldunum umleið 260 mió. kr. meira at ráða yvir um árið. Roknað varð við, at hátturin, sum húsarhaldini fóru at raðfesta hesar pengar millum nýtslu og uppsparing, fór at hanga neyvt saman við framtíðarvónunum hjá føroysku húsarhaldunum. Tað ber ikki neyvt til at fylgja hvørjari krónu, men nú eitt ár er farið, kunnu vit meta um, hvussu hesin peningur er brúktur. Húsarhaldini hava fingið størri útreiðslur, t.d. í sambandi við príshækkingar á ravmagni og brennievni, og nakað av peninginum er farið til hetta. Nakað er eisini farið til innflutning av drúgvum nýtsluvørum, og nakað er farið til uppsparing og niðurgjalding av skuld. Seinastu treystutølini vísa, at húsarhaldini eru vorðin meira bjartskygd seinastu 12 mánaðirnar, og tí kunnu vit vænta, at uppsparingarparturin fer at minka, meðan nýtsluparturin fer at økjast.

## 4.5 Tað almenna

Samlaða úrslitið hjá landi, kommunum og sosialum grunnum er batnað seinastu árini. Í 2009, tá ið undirskotið var størst, var úrslitið eitt hall upp á 691 mió. kr., ið samsvaraði við 5,7% av BTÚ. Í ár verður roknað við, at almenna hallið verður áleið 300 mió. kr., ið samsvarar við 2,1% av BTÚ.

**Talva 4.3: Úrslit í almenna geiranum, 2007-2013**

| *mió. kr.* | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** | **2013** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Landið | 146 | -330 | -688 | -581 | -402 | -340 | -243 |
| Kommunurnar | -103 | -347 | -141 | 24 | -53 | -75 | -50 |
| ALS | 94 | 56 | 18 | -112 | -189 | -78 | -76 |
| AMEG | 102 | 98 | 120 | 94 | 65 | 78 | 69 |
| **Úrslit tilsamans** | **239** | **-523** | **-691** | **-575** | **-579** | **-415** | **-300** |
| Úrslit í prosent av BTÚ | 1,9 | -4,3 | -5,7 | -4,4 | -4,4 | -3,0 | -2,1 |

*Kelda: Fíggjarmálaráðið, Landsbanki Føroya og ALS.*

Undirskotini seinastu árini hava økt um skuldina hjá landinum og kommunum, og hava eisini minkað munandi um eginogina í ALS.

Í sambandi við, at útgjaldið er hækkað, er eisini yvirskotið í AMEG minkað, og hevur seinastu trý árini ligið á einum støði, sum er eini 30-40 mió. kr. lægri enn árini frammanundan.

Skuldin hjá landinum verður umleið 5,4 mia. kr. við árslok og samlaða ognin verður mett til at vera umleið 5,2 mia. kr.

Nettoskuldin hjá kommununum verður umleið 0,6 mia. kr. við árslok, og bruttoskuldin verður umleið 1 mia. kr.

Samlaða bruttoskuldin hjá landi og kommunum nærkast sostatt 6,4 mia. kr. Hetta samsvarar við umleið 44% av BTÚ.

Við árslok verður samlaða almenna skuldin væntandi størri enn almenna ognin. Í 2008 var nettoognin omanfyri 20% av BTÚ. Nettoognin er sostatt minkað nógv seinastu árini.

## 4.6 Gjalds- og handilsjavni

Føroyski gjaldsjavnin er ein uppgerð av øllum flytingum millum Føroyar og útheimin. Seinastu tvey árini, ið higartil eru staðfest, eru 2010 og 2011, sum vísa avlop á gjaldsjavnanum uppá ávikavist 811 og 1.043 mió. kr., sí mynd 4.2. Úrslitið fyri 2012 er ikki tøkt enn, men verður innflutningur av skipum og flogførum tikin við, verður mett, at hetta úrsliti eisini kemur at vísa eitt avlop.

**Mynd 4.2: Føroyska gjaldsjavnaúrslitið, 1998-2011**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Gjaldsjavnin verður vanliga býttur upp í tænastu- og handilsjavna umframt ymsar inntøkuflytingar. Síðstu árini er tað serliga útflutningurin av ali- og uppisjóvarfiski og lægri vøruinnflutningur, ið hava økt um handilsjavnaavlopið. Fyri 2012 sær tó út til, at innflutningurin, íroknað skip og flogfør, var hægri enn útflutningurin. Inntøkuflytingarnar eru ríkisveitingin úr Danmark umframt lønir og inntøkur og útreiðslur av fíggjarognum. Í 2011 var nettoavkastið av fíggjarognum -12 mió. kr., meðan lønarflytingarnar netto vóru 666 mió. kr.

Tað vísir seg, at lønir frá føroyingum, sum arbeiða uttanlands, seinastu árini hava givið vaksandi íkast til føroyska samfelagið. Henda lønarinntøkan lá um stívliga 300 mió. kr. árini 1998-2004. Men síðani tá er hon vaksin í stórum á hvørjum ári, so at í 2011 arbeiddu føroyingar uttanlands fyri 850 mió. kr.

### 4.7 Útlit fyri føroyska búskapin

Vøksturin í nominella BTÚ var 2,4% í 2011. Hetta er áleið tað sama sum prísvøksturin, sum var 2,3% í 2011. Í 2012 metir Fíggjarmálaráðið, at talan var um ein vøkstur í nominella BTÚ á 3,5%. Hetta samsvarar við vøksturin í lønargjaldingunum og er 1,4% omanfyri prísvøksturin í 2012.

Fíggjarmálaráðið metir, at nominelli BTÚ-vøksturin verður 3% í 2013 og 2014. Prísvøksturin í 2012 var 2,1%, og mett verður, at talan verður um nakað sama prísvøkstur í 2013 og 2014. Roknað verður sostatt við nakað av realvøkstri í 2013 og 2014. Men samanlagt verður hildið, at talan er um varliga meting.

Sum grundarlag fyri metingini eru brúkt søgulig tøl og vitan um rákið innan ymsar tjóðarbúskaparlig hagtøl. Harumframt hevur eisini verið hugt at útlitunum fyri gongdini í ymisku geirunum í búskapinum. Eisini verða forsagnir hjá Búskaparráðnum brúktar sum partur av grundarlagnum fyri at meta um búskaparvøksturin.

**Mynd 4.3: Vøkstur í BTÚ og prísvøkstur, 2002-2014**




*Kelda: Hagstovan, Búskaparráðið og Fíggjarmálaráðið*

## 4.8 Avbjóðingar fyri føroyska búskapin

Føroyski búskapurin hevur fleiri avbjóðingar fyri framman. Niðanfyri verður í stuttum sagt frá teimum fimm høvuðsavbjóðingunum, og hvat Landstýrið arbeiðir við í hesum sambandi.

*Manglandi tilflyting*

Manglandi tilflytingin er rættiliga komin á breddan seinnu árini. Stóri spurningurin er, hvat skal gerast fyri at tryggja, at ein størri partur av okkara ungu og nýútbúnu velja at búseta seg í Føroyum.

Talan er um ein samansettan trupulleika, og tað finst ikki nøkur einføld loysn. Talan er um eina røð av átøkum, sum mugu fremjast. Tað er greitt, at broytingar mugu til á bústaðarmarknaðinum fyri at tryggja eitt breiðari og meira nútíðarhóskandi útboð av leigubústøðum. Broytingar mugu eisini til á útbúgvingarøkinum, soleiðis at vit kunnu fáa fleiri útbúgvingarmøguleikar. Neyðugt verður eisini at endurskoða vinnupolitikkin og skattapolitikkin, tí tað er umráðandi, at búskapurin frameftir fer at skapa fleiri størv, sum hesir persónar hava áhuga í.

Landstýrið hevur sett ein skjóttarbeiðandi bólk at koma vit tilmælum, og hetta arbeiðið verður lagt fram í næstum. Ætlanin er, at tilmælið skal vera grundarlagið undir einum miðvísum arbeiði at venda gongdini.

*Minkandi skattagrundarlag vegna uttanlandsarbeiði*

Eitt vaksandi tal av føroyingum arbeiðir uttanlands, og í útgangsstøðinum er tað sjálvandi at fegnast um, at føroysk arbeiðsmegi er flytfør og nógv eftirspurd aðrastaðni. Uttanlandsarbeiði kann síggjast sum eitt slag av útflutningi, sum økir um samlaðu inntøkurnar í føroyska samfelagnum.

Men fyri almennu kassarnar er gongdin ein avbjóðing. Almennu inntøkurnar stava fyri tað mesta frá lønarskatti, og gongdin hevur við sær, at skattagrundarlagið minkar.

Flatskattalættin ger góðan mun, við tað, at skattafyrimunurin av at arbeiða uttanlands nú er minni. Men talan er framvegis um eina avbjóðing, sum helst krevur umleggingar í skattaskipanini. Landsstýrið er í ferð við at kanna ymiskar møguleikar í hesum sambandi.

*Ov lítlil virðisøking í fiskivinnuni*

Fyri at fáa eina góða og produktiva fiskivinnu, mugu tvær fyritreytir vera til staðar. Fyri tað fyrsta, má veiðan vera lívfrøðiliga burðardygg. Tað vil siga, at veiðutrýstið má ikki støðugt vera ov høgt (ella ov lágt). Fyri tað næsta, má samlaða arbeiðsmegin og samlaði kapitalurin í vinnuni vera búskaparliga hóskandi í mun til virðið á veiðuni, soleiðis at samlaða avlopið altíð verður sum mest.

Tað sær út til, at fyri ein stóran part av fiskiveiðuni eru hesar báðar treytir ikki uppfyltar.

Um tann fyrsta treytin skal vera uppfylt, má ein langtsiktað ætlan leggjast fyri samlaðu fiskiveiðuna. Henda ætlan má vera lívfrøðiliga nøktandi og kunna tryggjast av einum hóskandi veiðieftirliti.

Tann næsta fyritreytin krevur, at ein marknaðarbúskapur er til staðar inni í fiskivinnuni, sum tryggjar eina hóskandi frágongd av kapitali og arbeiðsmegi, so hvørt sum tøkniliga menningin ger fiskiveiðuna meira effektiva. T.d. hava onnur lond góðar royndir við frítt umsetiligum kvotum.

Landsstýrið arbeiðir við eini fiskvinnunýskipan, sum skal tryggja fiskivinnuni støðugar karmar frameftir.

*Vaksandi tal av eldri*

Talið av eldri føroyingum er vaksandi og fer at vaksa enn skjótari komandi 20-30 árini. Hetta er ein avbjóðing fyri vælferðarsamfelagið, tí hetta hevur við sær vaksandi útreiðslur til heilsuverk, til eldrarøkt og til almannapensjónir. Samstundis verður talið av persónum í arbeiðsførum aldri, í besta føri, óbroytt, men allarhelst lækkandi.

Arbeitt verður við einari pensjónsnýskipan, og fyrsti partur, sum er eftirlønarlógin, er longu borin í Tingið. Arbeitt verður í einum politikum fylgibólki, har allir flokkar eru umboðaðir. Ætlanin er at finna eina samlaða loysn á pensjónsviðurskiftunum frameftir.

*Bygnaðarligt undirskot á fíggjarlógini*

Vaksandi trýstið á almennu útreiðslurnar ger tað sera umráðandi, at vit komandi árini fáa vent bygnaðarliga undirskotinum á fíggjarlóg landsins til eitt støðugt yvirskot, soleiðis at vit fáa rindað skuldina niður komandi árini. Hetta fer at hava við sær minkandi rentuútreiðslur, soleiðis at rúm verður fyri teimum vaksandi almannaútreiðslunum.

Í játtanarkørmunum verður sagt frá landsstýrisins ætlan at fáa undirskotið burtur í 2016.

# 5. KARMAFORTREYTIR

**5.1 Høvuðsfortreytin við uppskotinum til játtanarkarmar 2014-2018**
Høvuðsfortreytin fyri uppskotinum til játtanarkarmar 2014-2018 er ásetingin í samgonguskjalinum, at RLÚ-undirskotið skal vera burtur í 2016. Sambært játtanarkørmunum 2013-2017, ið Løgtingið samtykti í mai í fjør, minkar landskassahallið eftir 4 árum, soleiðis at avlop er aftur á fíggjarlógini í 2016.

Játtanarkarmarnir fyri árini 2014-2018 taka sostatt byrjanarstøði í tí ætlan, sum Løgtingið samtykti í fjør. Býtið millum einstøku greinarnar er tó broytt samsvarandi gjørdum broytingum í málsøkjabýtinum. Til dømis bruttofisering av almannaveitingum veksur karmin hjá §12 Almannamál, og samanhoyrandi inntøkur eru settar á § 3 Fíggjarmál og § 20 Inntøkur, so nettoúrslitið á RLÚ-kontuni er óávirkað. Flytingin av virkseminum hjá Landsbankanum økir rentuinntøkurnar netto á § 20 Inntøkur og rakstrarútreiðslurnar á § 3 Fíggjarmál, tó so at netto er sparing samsvarandi játtanarkarmunum 2013-2017. Harafturat eru politiskar broytingar í samanseting av útreiðslu- og inntøkusíðuni og øðrum tillagingum. Nominel lønarframskriving er givin ávísum stovnum í 2014, men seinni ár er roknað við føstum prísum. Prísvøkstur er ikki afturborin stovnunum, uttan har hetta spesifikt er nevnt.

**5.2 Fortreytir fyri útreiðsluframskrivingunum 2014-2018**
Útreiðslukarmarnir 2014-2018 eru framskrivaðir í 2014 prísum. Tað merkir í hesum førum, at lønarframskriving er givin ávísum stovnum í 2014, men at møguligar lønar- og prísbroytingar eftir 2014 ikki er í karmunum. Talan er sostatt um sokallaðar mongdarframskrivingar frá 2014-2018, sum í høvuðsheitinum eru grundaðar á fólkatal og fólkasamanseting, t.d. mettu gongdina í talinum av skúlanæmingum og pensjónistum frá 2014 til 2018. Vøkstur í talinum av fólkapensjonistum er t.d. ein stór orsøk til, at framskrivingar á § 12 Almannamál eru stórar. Í framskrivingunum er hædd tikin fyri bundnum raðfestingunum komandi árunum, t.d. avleiðingar av opnaðum sambýlum o.t.

**5.3 Fortreytir fyri inntøkuframskrivingunum 2014-2018**
Inntøkurnar í karmauppskotinum 2014-2018 eru framskrivaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fortreytum, vit kenna í løtuni. Vanligur landsskattur og meirvirðisgjald umboða umleið 65% av samlaðu inntøkum landskassans og hava tí stóran týdning fyri inntøkugongdina hjá landskassanum.

Sum grundarlag fyri metingum fyri búskaparvøksturin komandi árini verða brúkt søgulig tøl, vitan um búskapargongdina seinastu árini, og vitan um rákið innan ymisk tjóðarbúskaparlig hagtøl. Eisini verða forsagnir hjá øðrum stovnum, t.d. hjá Búskaparráðnum og Landsbankanum brúktar sum partur av grundarlagnum fyri at meta um búskaparvøksturin. Tað skal eisini viðmerkjast, at serlig viðurskifti, t.d. í ávísum vinnugreinum, eisini eru tikin við í grundarlagið fyri framskrivingunum. Í karmafortreytunum 2014-2018 verður BTÚ í leypandi prísum sostatt mett til 3 % í 2013 og fram, altso eitt sindur varisligari enn Búskaparráðið metti fyri árið 2013 og í miðal um tað sama sum Landsbankin metir fyri 2013-2014.

Skattir, ið eru grundaðar á inntøku og nýtslu verða í fortreytunum settir at fylgja sama vøkstri sum BTÚ, t.e. 3 % í leypandi prísum, tó so, at á teimum skattakontum, har tað verður mett neyðugt, eru gjørdar serligar metingar út frá fortreytunum fyri kontuna. Til dømis er konta *54.1.01. Aðrar inntøkur* sett at minka í framskrivingini, av tí at verandi víddargjaldið til oljuvinnuna í

framskrivingini er sett at falla burtur, og er inntøkuskatturin lækkaður, tí at lønarframskriving ikki er framroknað fyri starvsfólk hjá landinum eftir 2014.

Inntøkuframskrivingarnar frá 2014 til 2018 eru tillagaðar, so at atlit eru tikin til møguligar lønar- og prísbroytingar á útreiðslusíðuni hjá landinum, t.e. lønarvøkstur hjá privata og kommunala arbeiðsmarknaðinum er við í framroknaðu tølunum, men hjá landinum er lønarvøkstur einans roknað við í 2014.

# 6. FRAMSKRIVINGAR

Talva 6.1 vísir framskrivingar fyri árini 2013-2018. Tølini fyri 2013 eru fíggjarlógartøl uttan møguligar eykajáttanir, og tølini árini eftir eru framd við teimum framskrivingum, sum vóru kendar í mars 2013. Gjørt verður vart við, at talvan er uttan løgujáttanir og áðrenn tiltøk.

**Talva 6.1: § 1 -§ 20 framskrivingar tilsamans (uttan løgujáttan)**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarj.** | **2.923.497** | **2.960.959** | **2.984.452** | **2.989.843** | **3.004.114** | **3.018.171** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *102* | *103* | *103* |
| **Lógarb. játtan** | **1.420.801** | **1.450.489** | **1.480.940** | **1.509.778** | **1.536.489** | **1.560.797** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *104* | *106* | *108* | *110* |
| **Stuðulsj.** | **132.807** | **132.022** | **132.579** | **132.744** | **133.317** | **133.217** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **4.477.105** | **4.543.469** | **4.597.972** | **4.632.365** | **4.673.919** | **4.712.185** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *103* | *103* | *104* | *105* |
| **§ 20 Inntøkur** | **4.492.290** | **4.440.846** | **4.488.030** | **4.580.210** | **4.680.117** | **4.784.748** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *100* | *102* | *104* | *107* |
| **Yvirskot (uttan løgujáttan)** | **15.185** | **-102.624** | **-109.942** | **-52.155** | **6.198** | **72.563** |
| *Indeks* | *100* | *-676* | *-724* | *-343* | *41* | *478* |

*Viðm: 2013-tølini eru fíggjarlógartøl, uttan møguligar eykajáttanir. Legg til merkis, at "Yvirskot" her er áðrenn løgujáttanir og áðrenn tiltøk.*

Framskrivað er við metingum av ymsu játtanunum á fíggjarlógini. Til dømis er tal á fólkapensjonistum, tal á næmingum og lesandi, bundnar raðfestingar til upplating av heimum, heilivágskostnaður, og tøl samsvarandi hesum, sett inn í framskrivingarnar. Orsøkin til fallið á § 20 Inntøkur í 2014 í mun til 2013 er reint tekniskt, at skattur frá fiskatilfeingi sambært lóg fellur burtur við ársenda 2013. Samsvarandi inntøkur eru sett á sum tiltak, so aftaná tiltak er ikki hetta fall í inntøkunum.

Framskrivingar býtt á greinar er víst niðanfyri:

**Talva 6.2: § 1 -§ 20 framskrivingar tilsamans (uttan løgujáttan)**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 1 Løgtingið** | **45.000** | **44.765** | **45.465** | **46.065** | **46.665** | **47.465** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *101* | *102* | *104* | *105* |
| **§ 2 Løgmansskrivstovan** | **46.300** | **46.300** | **46.300** | **46.300** | **46.300** | **46.300** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **§ 3 Fíggjarmál** | **300.916** | **298.545** | **301.559** | **300.417** | **304.925** | **309.026** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *100* | *100* | *101* | *103* |
| **§ 5 Fiskivinumál** | **149.900** | **150.504** | **152.104** | **150.504** | **150.504** | **150.504** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *101* | *100* | *100* | *100* |
| **§ 6 Vinnumál** | **302.804** | **302.709** | **301.609** | **301.609** | **301.609** | **301.609** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **§ 7 Mentamál** | **937.154** | **951.155** | **959.316** | **966.560** | **973.863** | **976.863** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *103* | *104* | *104* |
| **§ 11 Heilsumál** | **907.582** | **921.914** | **929.227** | **936.717** | **944.388** | **952.245** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *102* | *103* | *104* | *105* |
| **§ 12 Almannamál** | **1.681.924** | **1.724.959** | **1.758.323** | **1.782.174** | **1.803.746** | **1.826.354** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *106* | *107* | *109* |
| **§ 15 Innlendismál** | **105.525** | **102.620** | **104.070** | **102.020** | **101.920** | **101.820** |
| *Indeks* | *100* | *97* | *99* | *97* | *97* | *96* |
| **Tilsamans** | **4.477.105** | **4.543.469** | **4.597.972** | **4.632.365** | **4.673.919** | **4.712.185** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *103* | *103* | *104* | *105* |
| **§ 20 Inntøkur** | **4.492.290** | **4.440.846** | **4.488.030** | **4.580.210** | **4.680.117** | **4.784.748** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *100* | *102* | *104* | *107* |
| **Yvirskot (uttan løgujáttan)** | **15.185** | **-102.624** | **-109.942** | **-52.155** | **6.198** | **72.563** |
| *Indeks* | *100* | *-676* | *-724* | *-343* | *41* | *478* |

*Viðm: 2013-tølini eru fíggjarlógartøl, uttan møguligar eykajáttanir. Leggið til merkis, at "Yvirskot" her er áðrenn løgujáttanir og áðrenn tiltøk.*

Konturnar við størstu útreiðsluframskriving eru Fólkapensjón (80 mió. kr. til 2018), Serforsorg (28 mió. kr. til 2018) og heilsutrygdarveitingar (17,2 mió. kr. til 2018). Tær 10 konturnar við størst framskriving kosta tilsamans knappar 200 mió. kr.

**Talva 6.3.: 10 størstu útreiðsluframskrivingarkonturnar**

| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|
| **10 størstu framskrivingar tilsamans** | **49.035** | **98.171** | **133.416** | **167.337** | **198.292** |

Í appendiks 1 síggjast útgreiningar av framskrivingum býttar eftir grein og høvuðskontu. Eisini eru viðmerkingar til framskrivingarnar.

# 7. TILTØK 2014-2018

Tiltøkini eru sett upp í sparitiltøk og raðfestingar, sum Landsstýrið ætlar at fremja í 2014 og fram. Samantald tiltøk býtt á greinar síggjast í talvu 7.1. niðanfyri.

**Talva 7.1: Tiltøk 2014-2018 býtt á greinar**

| **Grein** | | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 69 | 5.138 | 11.608 | 12.008 | 12.008 |
| § 3 | Fíggjarmál | 3.632 | 13.014 | 27.146 | 31.146 | 34.646 |
| § 5 | Fiskivinnumál | 2.927 | 5.054 | -4.919 | -3.519 | -3.519 |
| § 6 | Vinnumál | 8.600 | 10.500 | 10.800 | 10.800 | 10.800 |
| § 7 | Mentamál | 4.891 | 13.882 | 23.573 | 32.973 | 34.973 |
| § 11 | Heilsumál | 4.700 | 16.100 | 26.700 | 35.200 | 39.800 |
| § 12 | Almannamál | 3.277 | 3.554 | 29.031 | 35.331 | 41.631 |
| § 15 | Innlendismál | 2.079 | 3.808 | 5.467 | 5.467 | 5.467 |
| **Rakstrartiltøk tilsamans** | | **30.175** | **71.051** | **129.406** | **159.406** | **175.806** |
| § 20 | Inntøkur | 160.300 | 170.135 | 179.550 | 180.000 | 180.000 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **190.475** | **241.186** | **308.956** | **339.406** | **355.806** |

Tilsamans verða gjørd rakstrartiltøk fyri 30 mió. kr. í 2014 vaksandi til 129 mió. kr. í 2016. Partur av tiltøkunum á §§ 2-3 eru tvørgangandi, t.e. eru ábyrgd hjá ávikavist løgmanni og landsstýrismanninum í fíggjarmálum, men skulu tiltøkini/sparingin býtast á allar greinar.

Í appendiks 2 síggjast útgreiningar av tiltøkunum býttar eftir grein og høvuðskontu. Eisini eru viðmerkingar til tiltøkini.

# 8. LØGUR 2014-2018

Talva 8.1 vísir løguætlan landsstýrisins fyri 2014-2018 býtt á greinar.

**Talva 8.1: Løgur 2014-2018 býtt á greinar**

| Grein | | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| § 3 | Fíggjarmál | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| § 5 | Fiskivinnumál | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| § 6 | Vinnumál | 21.400 | 34.500 | 1.000 | 10.000 | 0 |
| § 7 | Mentamál | 113.000 | 109.000 | 109.500 | 3.000 | 13.500 |
| § 11 | Heilsumál | 44.000 | 40.000 | 39.000 | 149.000 | 139.000 |
| § 12 | Almannamál | 37.250 | 14.250 | 500 | 7.000 | 5.000 |
| § 15 | Innlendismál | 104.100 | 98.100 | 100.400 | 118.900 | 127.900 |
| ***Løgur tilsamans*** | | **322.750** | **298.850** | **253.400** | **290.900** | **288.400** |

Landsstýrið hevur sett upp langtíðarløguætlan fyri árini 2014-2018, sí appendiks 3, har løgurnar eru ítøkiliga útgreinaðar fyri árini 2014-2024.

Løgukarmurin er hækkaður til 323 mió. kr. í 2014 fyri at stimbra virksemið í landinum. Síðani lækkar løguvirksemið í 2015 og 2016, og er karmurin aftur um 290 mió. kr. í 2017-2018.

Størstu løgurnar í 2014 eru skúlin við Marknagil (85 mió. kr.), tunnil til Viðareiðis (43,5 mió. kr.), Landssjúkrahúsið (30 mió. kr.), umvæling av almennum bygningum (26,5 mió. kr.) og vardir bústaðir í Eysturoynni og í Norðoyggjum (20,3 mió. kr). Løgurnar hjá landinum fara sostatt í stóran mun at stimbra virksemið í handverkara- og byggivinnuni komandi árið.

Í appendiks 3 síggjast útgreiningar av løgunum býttar eftir grein og høvuðskontu. Eisini eru viðmerkingar til tiltøkini.

# 9. RLÚ-ÚRSLIT 2014-2018

Talva 9.1. vísir samantaldu fíggjarætlanina fyri, hvussu málið at fáa avlop aftur á fíggjarlógina í 2016 verður rokkið.

**Talva 9.1: Høvuðsyvirlit yvir RLÚ-úrslit 2013-2018**

| *Mió. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur, §1-§15: | | | | | | |
| Útreiðslur byrjan | 4.477 | 4.477 | 4.513 | 4.528 | 4.503 | 4.515 |
| Framskrivingar | 0 | 66 | 55 | 34 | 42 | 38 |
| Tiltøk í árinum | 0 | -30 | -41 | -58 | -30 | -16 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **4.477** | **4.513** | **4.528** | **4.503** | **4.515** | **4.536** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *101* | *101* | *101* | *101* |
| **Løguútreiðslur, §1-§15** | **258** | **323** | **299** | **253** | **291** | **288** |
| *Indeks* | *100* | *125* | *116* | *98* | *113* | *112* |
| **Rentuútreiðslur netto, §20** | **93** | **54** | **60** | **72** | **80** | **87** |
| *Indeks* | *100* | *58* | *65* | *77* | *86* | *94* |
| Inntøkur, §20: | | | | | | |
| Inntøkur byrjan | 4.507 | 4.507 | 4.655 | 4.718 | 4.832 | 4.940 |
| Framskrivingar | 0 | -12 | 53 | 104 | 108 | 112 |
| Tiltøk í árinum | 0 | 160 | 10 | 9 | 0 | 0 |
| **Inntøkur tilsamans** | **4.507** | **4.655** | **4.718** | **4.832** | **4.940** | **5.052** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *107* | *110* | *112* |
| **RLÚ-úrslit** | **-322** | **-235** | **-168** | **3** | **55** | **140** |

Rakstrartiltøk verða gjørd fyri um30 mió. kr. í 2014 og aðrar 41 mió. kr. í 2015.

Inntøkutiltøk fyri 160 mió. kr. verða framd í 2014. Síðani er ávísur vøkstur framskrivaður.

# APPENDIKS 1: FRAMSKRIVINGAR

Talvurnar vísa framskrivingar fyri 2014-2018 býttar á greinar, játtanarsløg og høvuðskontur. Fyri hvørja grein á fíggjarlógini er fyrst ein talva, sum telur saman, og síðan er ein talva har einans tær høvuðskonturnar eru við, sum verða framskrivaðar.

## § 1 Løgtingið

**Talva A.1: Samlaðar framskrivingar fyri § 1 Løgtingið**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarj.** | **39.865** | **39.465** | **39.465** | **39.465** | **39.465** | **39.465** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *99* | *99* | *99* | *99* |
| **Lógarb. játtan** | **5.135** | **5.300** | **6.000** | **6.600** | **7.200** | **8.000** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *117* | *129* | *140* | *156* |
| **Stuðulsj.** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| *Indeks* | - | - | - | - | - | - |
| **Tilsamans** | **45.000** | **44.765** | **45.465** | **46.065** | **46.665** | **47.465** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *101* | *102* | *104* | *105* |

**Talva A.2: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 1 Løgtingið**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Løgtingsarbeiði | 30.565 | 30.165 | 30.165 | 30.165 | 30.165 | 30.165 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **30.565** | **30.165** | **30.165** | **30.165** | **30.165** | **30.165** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *99* | *99* | *99* | *99* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | 5.135 | 5.300 | 6.000 | 6.600 | 7.200 | 8.000 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **5.135** | **5.300** | **6.000** | **6.600** | **7.200** | **8.000** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *117* | *129* | *140* | *156* |

**Løgtingsarbeiði:** Norðurlandaráðið hevur fund í Føroyum í 2013, upphæddin fellur burtur í 2014.

**Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn**: Játtanin er hækkandi vegna øktar útreiðslur til eftirløn.

## § 2 Løgmansfyrisitingin

**Talva A.3: Samlaðar framskrivingar fyri § 2 Løgmansfyrisitingin**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarj.** | **38.300** | **38.300** | **38.300** | **38.300** | **38.300** | **38.300** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Lógarb. játtan** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| *Indeks* | - | - | - | - | - | - |
| **Stuðulsj.** | **8.000** | **8.000** | **8.000** | **8.000** | **8.000** | **8.000** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **46.300** | **46.300** | **46.300** | **46.300** | **46.300** | **46.300** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |

Á § 2 Løgmansfyrisitingin er ongin broyting í framskrivingum árini 2014-2018.

## § 3 Fíggjarmál

**Talva A.4: Samlaðar framskrivingar fyri § 3 Fíggjarmál**

| *Tús. kr.* | FL2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **129.766** | **126.766** | **124.966** | **119.366** | **119.566** | **119.366** |
| *Indeks* | *100* | *98* | *96* | *92* | *92* | *92* |
| **Lógarb. játtan** | **170.950** | **171.579** | **176.393** | **180.851** | **185.159** | **189.460** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *103* | *106* | *108* | *111* |
| **Stuðulsjáttan** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **300.916** | **298.545** | **301.559** | **300.417** | **304.925** | **309.026** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *100* | *100* | *101* | *103* |

**Talva A.5: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 3 Fíggjarmál**

| *Tús. kr.* | FL2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Fíggjarmálaráðið | 10.689 | 9.689 | 9.689 | 9.689 | 9.689 | 9.689 |
| Sáttmálaviðurskifti | 300 | 400 | 600 | 400 | 600 | 400 |
| TAKS | 69.587 | 68.487 | 66.487 | 61.087 | 61.087 | 61.087 |
| Føroya Gjaldstova | 30.980 | 30.480 | 30.480 | 30.480 | 30.480 | 30.480 |
| Hagstova Føroya | 11.340 | 10.840 | 10.840 | 10.840 | 10.840 | 10.840 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **122.896** | **119.896** | **118.096** | **112.496** | **112.696** | **112.496** |
| *Indeks* | *100* | *98* | *96* | *92* | *92* | *92* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Tænastumannaeftirlønir | 21.000 | 21.189 | 21.613 | 21.851 | 22.069 | 22.290 |
| Læraraeftirlønir, útreiðslujáttan | 37.500 | 40.300 | 43.600 | 46.900 | 50.200 | 53.500 |
| Eftirlønir innan heilsuverkið | 13.100 | 13.600 | 14.100 | 14.600 | 15.100 | 15.600 |
| Postverk Føroya | 7.850 | 8.450 | 9.050 | 9.300 | 9.600 | 9.800 |
| Eftirlønir | 500 | 470 | 470 | 470 | 470 | 470 |
| Danskar eftirlønir | 1.400 | 1.370 | 1.360 | 1.330 | 1.320 | 1.300 |
| Eftirlønir landsstýrismanna | 2.100 | 2.200 | 2.200 | 2.400 | 2.400 | 2.500 |
| Stuðul til flutning og dupult húsarhald | 15.750 | 15.750 | 15.750 | 15.750 | 15.750 | 15.750 |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 71.750 | 68.250 | 68.250 | 68.250 | 68.250 | 68.250 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **170.950** | **171.579** | **176.393** | **180.851** | **185.159** | **189.460** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *103* | *106* | *108* | *111* |

**Fíggjarmálaráðið:** 1 mió. kr. er í 2013 sett av til verkætlan viðvíkjandi talgildum roknskapi. Upphæddin fellur burtur við ársenda 2013.

**Sáttmálaviðurskifti**: Upphæddir sambært meting um samráðingarvirksemi.

**TAKS**: Upphædd á 1,1, mió. kr. viðvíkjandi pensjónsnýskipan fellur burtur við ársenda 2013, og minkar játtanin sostatt við somu upphædd í 2014. Settar eru 5 mió. kr. av til íløgur í nýggja skattaskipan í 2013, og sama upphædd verður játtað í 2014, men játtanin minkar niður í 4 mió. kr. í 2015.Tá nýggja skattaskipanin er liðugt ment, verður spart 1 mió. kr. í rakstri í 2015. Sostatt lækkar játtanin 2 mió. kr. frá 2014 til 2015. Í 2016 fella tær 4 mió. kr. til menning av nýggju skattaskipanini burtur, og verða spardar aðrar 1,4 mió. kr. í rakstri árliga frá og við 2016. Játtanin lækkar sostatt 5,4 mió. kr. frá 2016 í mun til 2015.

**Føroya Gjaldstova**: Játtanin til *UK 30 Umsiting av ogn og skuld landsins* er 0,5 mió. kr. hægri í 2013 enn í seinni árum fyri at fíggja møguligar útreiðslur í sambandi við flytingina av virksemi frá Landsbanka Føroya. Tessvegna lækkar játtanin hjá Gjaldstovuni ½ mió. kr. í 2014.

**Hagstova Føroya**: Verkætlanin Manntal hevur játtan á 0,5 mió. kr. í 2013, ið fellur burtur. Játtanin lækkar tí 0,5 mió. kr. í 2014.

**Ymiskar eftirlønir**: Framskrivað sambært metingum fyri gongdina í talinum á persónum í tænastamannaeftirløntum skipanum ella í líknandi skipanum.

**Stuðul til rentuútreiðslur**: Sambært galdandi lóg lækkar rentustuðulin 1 prosentstig í 2014 til 35%. Hvørt prosentstig í lækking verður mett at spara landskassanum  3,5 mió. kr. við verandi rentustøði. Framroknað er ikki við broyting í rentustøðinum.

## § 5 Fiskivinnumál

**Talva A.6: Samlaðar framskrivingar fyri § 5 Fiskivinnumál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **133.790** | **134.394** | **135.994** | **134.394** | **134.394** | **134.394** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *102* | *100* | *100* | *100* |
| **Lógarb. játtan** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Stuðulsjáttan** | **13.610** | **13.610** | **13.610** | **13.610** | **13.610** | **13.610** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **149.900** | **150.504** | **152.104** | **150.504** | **150.504** | **150.504** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *101* | *100* | *100* | *100* |

**Talva A.7: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 5 Fiskivinnumál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Lønarframskriving | 0 | 604 | 604 | 604 | 604 | 604 |
| Hvalagransking og hvalateljing vm. | 981 | 981 | 2.581 | 981 | 981 | 981 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **981** | **1.585** | **3.185** | **1.585** | **1.585** | **1.585** |
| *Indeks* | *100* | *162* | *325* | *162* | *162* | *162* |

**Lønarframskriving:** Lønarframskriving verður givin til høvuðskontur 31.1.01. Tilbúgving á landi , 31.1.06. Tilbúgving á sjógvi og 34.2.01. Fiskiveiðieftirlitið.

**Hvalagransking og hvalateljing v.m**: Framskrivað er við 1,6 mió. kr. í 2015 fyri hvalakanning, sum verður gjørd umleið 6. hvørt ár.

## § 6 Vinnumál

**Talva A.8: Samlaðar framskrivingar fyri § 6 Vinnumál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **199.454** | **198.434** | **197.334** | **197.334** | **197.334** | **197.334** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *99* | *99* | *99* | *99* |
| **Lógarb. játtan** | **83.300** | **85.000** | **85.000** | **85.000** | **85.000** | **85.000** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *102* | *102* | *102* | *102* |
| **Stuðulsjáttan** | **20.050** | **19.275** | **19.275** | **19.275** | **19.275** | **19.275** |
| *Indeks* | *100* | *96* | *96* | *96* | *96* | *96* |
| **Tilsamans** | **302.804** | **302.709** | **301.609** | **301.609** | **301.609** | **301.609** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |

**Talva A.9: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 6 Vinnumál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Lønarframskriving | | 1.080 | 1.080 | 1.080 | 1.080 | 1.080 |
| Jarðfeingi | 11.089 | 10.589 | 10.589 | 10.589 | 10.589 | 10.589 |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan | 15.373 | 14.873 | 14.873 | 14.873 | 14.873 | 14.873 |
| Strandfaraskip landsins | 139.046 | 137.946 | 136.846 | 136.846 | 136.846 | 136.846 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **165.508** | **164.488** | **163.388** | **163.388** | **163.388** | **163.388** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *98* | *98* | *98* | *98* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Barsilsskipan | 83.300 | 85.000 | 85.000 | 85.000 | 85.000 | 85.000 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **83.300** | **85.000** | **85.000** | **85.000** | **85.000** | **85.000** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *102* | *102* | *102* | *102* |
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi | -225 | -150 | -150 | -150 | -150 | -150 |
| Endurgjald til skipasmíð | 400 | 450 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| Havbúnaðarroyndir | 9.500 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| Orkumál | 2.400 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **12.075** | **11.300** | **11.300** | **11.300** | **11.300** | **11.300** |
| *Indeks* | *100* | *94* | *94* | *94* | *94* | *94* |

**Lønarframskriving:** Lønarframskriving er givin til høvuðskontu 38.2.04. Strandfaraskip Landsins.

**Jarðfeingi**: Játtanin til Jarðfeingi lækkar við 0,5 mió. kr. í 2014, tí at granskingarverkætlanir í størri mun skulu fíggjast uttanhýsis.

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**: Játtanin lækkar við 0,5 mió. kr. Játtanin hækkaði við 500 tkr. í 2013 til tess at seta orku av til at fáa í lag avtalur um sínamillum góðkenning av matvøru- og veterinerum myndugleikum.

**Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi:** Tað ber ikki til frammanundan at siga, um úrslit av forkanningarloyvum verða seld, tí er talan um eina meting sum tekur støðið í søluni undanfarin ár.

**Havbúnaðarroyndir**: Játtanin bleiv lækkað við 0,5 mió kr í 2013 og hækkar aftur við 0,5 mió kr í 2014.

**Orkumál**: Latin var stuðul í 2013, ið ikki er framskrivaður at halda fram í 2014.

**Barsilskipan:** Trupult er at meta neyvt um játtanartørvin til útgjøld úr Barsilsskipanini. Tað eru altíð fleiri óvissur tengdar at metingunum, m.a.:

- Burðartal
- Møguligar lønarhækkanir
- Tal av kvinnum og monnum, sum fara í farloyvi

Til tess at meta um útgjaldið úr skipanini, er støði m.a. tikið í miðaltali av føddum børnum. Í 2011 vóru 583 børn fødd, fram til 18. desember 2012 vóru 598 børn fødd.

Lønirnar hækkaðu eitt vet í 2012 og lønarútgjaldingarnar hækkaðu við uml. 3%. Harafturat kann væntast, at lønarhækkanin hjá starvsmonnum eisini kemur at ávirka útgjøldini úr Barsilsskipanini. Mett verður, at útgjøldini verða 1,2% hægri.

## § 7 Mentamál

**Talva A.10: Samlaðar framskrivingar fyri § 7 Mentamál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **739.346** | **753.547** | **757.547** | **760.547** | **763.547** | **766.547** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *102* | *103* | *103* | *104* |
| **Lógarb. játtan** | **126.751** | **125.702** | **129.206** | **132.785** | **136.415** | **136.415** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *102* | *105* | *108* | *108* |
| **Stuðulsjáttan** | **71.057** | **71.906** | **72.563** | **73.228** | **73.901** | **73.901** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *103* | *104* | *104* |
| **Tilsamans** | **937.154** | **951.155** | **959.316** | **966.560** | **973.863** | **976.863** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *103* | *104* | *104* |

**Talva A.11: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 7 Mentamál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Lønarframskriving | | 10.101 | 10.101 | 10.101 | 10.101 | 10.101 |
| Fólkaskúlin | 281.601 | 283.601 | 285.601 | 287.601 | 289.601 | 291.601 |
| Miðnámsútbúgvingar | 195.089 | 199.089 | 201.089 | 202.089 | 203.089 | 204.089 |
| Kringvarp Føroya | 1.900 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **478.590** | **492.791** | **496.791** | **499.791** | **502.791** | **505.791** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *104* | *104* | *105* | *106* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Lestrarstuðul | 126.751 | 125.702 | 129.206 | 132.785 | 136.415 | 136.415 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **126.751** | **125.702** | **129.206** | **132.785** | **136.415** | **136.415** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *102* | *105* | *108* | *108* |
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Stuðul til fólkaskúlar | 8.086 | 8.086 | 8.586 | 9.086 | 9.586 | 9.586 |
| Lestrarlán | 2.293 | 3.142 | 3.299 | 3.464 | 3.637 | 3.637 |
| Ymiskir studningar | 1.830 | 2.030 | 2.030 | 2.030 | 2.030 | 2.030 |
| Hugasamband Føroya | 650 | 450 | 450 | 450 | 450 | 450 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **12.859** | **13.708** | **14.365** | **15.030** | **15.703** | **15.703** |
| *Indeks* | *100* | *107* | *112* | *117* | *122* | *122* |

**Lønarframskriving:** Lønarskriving verður givin til undirvísingarstovnarnir á § 7 Mentamál, t.e. fólkaskúlan, Sernám, miðnámsútbúgvingar, Fróðskaparsetur Føroya v.m.

**Fólkaskúlin**: Framskrivingin er til hækking í eftirlønarútreiðslum í sambandi við, at tænastumenn fara frá, og sáttmálasettir verða settir í staðin og til starvsaldursbroytingar.

**Miðnámsútbúgvingar**: Við somu upptøku í 2013 og 2014 sum í 2012 verða fleiri flokkar inni í skipanini komandi árini. Ein aspergerflokkur verður settur á stovn á heysti 2013, tað hevur øktar útreiðslur í 2014 við sær.

**Kringvarp Føroya:** Játtanin til Kringvarp Føroya varð í 2013 hækkað við kr. 1,9 mió. fyri at minka um ávirkanina av tí niðurskurði, ið Kringvarpið noyddist at gera við árslok 2012. Upphæddin var einsinnisjáttan.

**Lestrarstuðul**: Lestrarstuðulin er framskrivaður við øktum virksemi.

**Stuðul til fólkaskúlar:** Frískúlin Keldan tekur ein flokk upp afturat hvørt ár, og tí hækkar stuðulin, sum tey hava rætt til sambært lóg.

**Lestrarlán:** Játtanin til lestrarlán er hækkað vegna mettan vøkstur av lántøkum.

## § 11 Heilsumál

**Talva A.12: Samlaðar framskrivingar fyri § 11 Heilsumál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **894.057** | **908.389** | **915.702** | **923.192** | **930.863** | **938.720** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *102* | *103* | *104* | *105* |
| **Lógarb. játtan** | **12.700** | **12.700** | **12.700** | **12.700** | **12.700** | **12.700** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Stuðulsjáttan** | **825** | **825** | **825** | **825** | **825** | **825** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **907.582** | **921.914** | **929.227** | **936.717** | **944.388** | **952.245** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *102* | *103* | *104* | *105* |

**Talva A.13:Útgreinaðar framskrivingar fyri § 11 Heilsumál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Lønarframskriving | 0 | 7.190 | 7.190 | 7.190 | 7.190 | 7.190 |
| Heilsutrygdarveitingar | 149.201 | 152.185 | 155.229 | 158.333 | 161.500 | 164.730 |
| Serstakur sjúkrahúsheilivágur | 36.296 | 37.748 | 39.258 | 40.828 | 42.461 | 44.160 |
| Serviðgerð uttanlands | 135.286 | 137.992 | 140.752 | 143.567 | 146.438 | 149.367 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **320.783** | **335.115** | **342.428** | **349.918** | **357.589** | **365.446** |
| *Indeks* | *100* | *104* | *107* | *109* | *111* | *114* |

**Lønarframskriving:** Lønarframskriving verður givin til Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús, Suðuroyar sjúkrahús, Sjúklingahotellið Tórshavn og ávísar smærri stovnar.

**Heilsutrygdarveitingar**: Tað hevur verið ein støðugur vøkstur í útreiðslunum til Heilsutrygdarveitingar seinastu árini, og kann sum dømi nevnast, at útreiðslurnar til kommunulæknahjálp vóru gott 39 mió. kr. í 2009, og verður roknað við, at hesar útreiðslur verða um 44,5 mió. kr. í 2013. Hetta svarar til 3,5% í vøkstri hesi seinastu árini. Útreiðslurnar til tannlæknahjálp vóru gott 14 mió. kr. í 2009, og verður roknað við, at hesar útreiðslur verða um 17 mió. kr. í 2013. Hetta svarar til góð 5% í vøkstri hesi seinastu árini. Heilivágsútreiðslurnar eru tálmaðar rættiliga nógv, við at tilskotsstigin er tillagaður soleiðis, at alsamt størri egingjald er hjá teimum, ið nýta heilivág.

**Serstakur sjúkrahúsheilivágur**: Framskrivað verður við 4% árliga. Hetta er partvís vegna serliga høgan prísvøkstur á heilivági, og partvís vegna vøkstur í mongdini av heilivági.

**Serviðgerð uttanlands**: Talið á sjúklingum, ið verða sendir til viðgerð uttanlands tykist økjast alsamt. Í 2006 vóru 1.975 sjúklingar sendir uttanlands til viðgerðar, og í 2011 vóru 2.513 sjúklingar sendir uttanlands til viðgerðar. Talan er um eina øking, sum liggur um 5% um árið einans í talinum av sjúklingaferðum. Roynt hevur verið alsamt at tálma nýtsluni, og ávís tíðarbil seinastu árini eru einans sjúklingar sendir uttanlands, ið høvdu bráðfengis tørv á viðgerð.

## § 12 Almannamál

**Talva A.14: Samlaðar framskrivingar fyri § 12 Almannamál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **649.739** | **664.690** | **676.620** | **680.271** | **683.671** | **687.071** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *104* | *105* | *105* | *106* |
| **Lógarb. játtan** | **1.019.165** | **1.047.408** | **1.068.842** | **1.089.043** | **1.107.215** | **1.126.423** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *107* | *109* | *111* |
| **Stuðulsjáttan** | **13.020** | **12.861** | **12.861** | **12.861** | **12.861** | **12.861** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *99* | *99* | *99* | *99* |
| **Tilsamans** | **1.681.924** | **1.724.959** | **1.758.323** | **1.782.174** | **1.803.746** | **1.826.354** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *106* | *107* | *109* |

**Talva A.15: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 12 Almannamál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Lønarframskriving | | 3.021 | 3.021 | 3.021 | 3.021 | 3.021 |
| Almannaverkið | 44.878 | 43.472 | 43.472 | 43.472 | 43.472 | 43.472 |
| KT-heildarskipan | 5.000 | 5.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Børn og ung | 49.108 | 49.560 | 49.908 | 49.908 | 49.908 | 49.908 |
| Serforsorg | 169.664 | 181.783 | 197.455 | 197.505 | 197.505 | 197.505 |
| Eldrarøkt | 337.694 | 338.460 | 339.370 | 342.970 | 346.370 | 349.770 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **606.344** | **621.295** | **633.225** | **636.876** | **640.276** | **643.676** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *104* | *105* | *106* | *106* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Barnavernd | 3.535 | 4.035 | 4.035 | 4.035 | 4.035 | 4.035 |
| Barnaískoyti | 7.780 | 7.930 | 8.080 | 8.230 | 8.380 | 8.530 |
| Dagpeningaskipan | 48.622 | 54.343 | 54.923 | 55.510 | 56.102 | 56.700 |
| Ansingarsamsýning | 13.135 | 14.635 | 14.635 | 14.635 | 14.635 | 14.635 |
| Vanlig forsorg | 128.564 | 127.940 | 130.168 | 130.168 | 130.168 | 130.168 |
| Arbeiðsfremjandi tiltøk | 30.010 | 32.010 | 34.010 | 34.010 | 34.010 | 34.010 |
| Fólkapensjón | 475.950 | 492.253 | 507.020 | 524.259 | 539.987 | 556.186 |
| Fyritíðarpensjón | 268.380 | 269.768 | 271.170 | 272.584 | 273.972 | 275.416 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 30.454 | 30.759 | 31.066 | 31.377 | 31.691 | 32.008 |
| Sjúkratrygd | 4.000 | 5.000 | 5.000 | 5.500 | 5.500 | 6.000 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **1.010.430** | **1.038.673** | **1.060.107** | **1.080.308** | **1.098.480** | **1.117.688** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *107* | *109* | *111* |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark | 1.148 | 1.048 | 1.048 | 1.048 | 1.048 | 1.048 |
| Stuðul til feløg | 2.563 | 2.463 | 2.463 | 2.463 | 2.463 | 2.463 |
| Stuðul til feløg hjá brekaðum | 3.714 | 3.432 | 3.432 | 3.432 | 3.432 | 3.432 |
| Avtøka av Happadráttargrunninum | -282 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Lán til ellis- og røktarheim í Vági | -2.707 | -2.666 | -2.666 | -2.666 | -2.666 | -2.666 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **4.436** | **4.277** | **4.277** | **4.277** | **4.277** | **4.277** |
| *Indeks* | *100* | *96* | *96* | *96* | *96* | *96* |

**Lønarframskriving:** Lønarskriving verður givin til høvuðskontur 21.6.01. Serforsorg og 21.3.08. Børn og ung.

**Almannaverkið:** Játtanin í 2014 verður framskrivað í mun til játtanarkarm fyri 2013.

**KT-heildarskipan til Almannastovuna:** Sambært viðmerkingunum til "Løgtingslóg nr. 110 frá 8. desember 2010 um keyp av øðrum parti av nýggjari kt-heildarskipan til Almannastovuna" falla 5 mió. kr. til gjaldingar í 2014. Lógin er galdandi til 31. desember 2014.

**Børn og ung**: Framskrivað er fyri fíggjarligum avleiðingum av "Løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2011 um bygging av stovni í Eysturoynni til børn við fjølbreki." Sambært viðmerkingum til lógina er ilt at meta um, hvør rakstrarkostnaðurin verður, tá nýggi stovnurin letur upp, men talan er um ein sera tungan bólk av børnum við fjølbreki. Verandi stovnur, Reiðrið, verður niðurlagdur, tá nýggi stovnurin letur upp og lagt verður upp fyri hægri árligari rakstrarútreiðslu. Játtanin til verandi stovn, Reiðrið, er umleið 2,7 mió. kr. í 2013. Avsett er til hægri játtan frá 1. apríl 2014, 952 tús.kr. og játtanin er hækkað við 348 tús.kr. afturat í 2015 til fult virksemi, soleiðis at samlaða játtanin til nýggja stovnin verður 4 mió. kr. í 2015. Játtanin í 2014 er annars framskrivað í mun til játtanarkarm fyri 2013.

**Serforsorg**: Framskrivað er fyri fíggjarligum avleiðingum av fylgjandi løgtingslógum, "Løgtingslóg nr. 78 frá 7. juni 2011 um bygging av sambýli í Tórshavn til fólk við sálarsjúku" og "Løgtingslóg nr. 81 frá 7. juni 2011 um at byggja vardar bústaðir í Norðoyggjum og Eysturoy til fólk við serligum tørvi".
Orsakað av seinkan í byggingini av sambýli fyri sálarsjúk, verður lagt upp fyri, at heimið letur upp í mars 2014. Upprunaliga var ætlanin, at heimið skuldi lata upp í januar 2013, síðani varð ætlanin at heimið skuldi lata upp 1. desember 2013, og á fíggjarlógini fyri 2013 er avsett játtan fyri ein mánað. Dagsprísurin er 1.700 kr. og búfólkatalið er mett at verða 12 - 16. Játtanin í 2014 er hækkað við 7.446 tús.kr. og í 2015 verður játtanin hækkað við 1.655 tús.kr. til fult virksemi, soleiðis at samlaða játtanin verður 9,9 mió. kr. í 2015.
Orsakað av seinkan í byggingini av vardum bústøðum í Norðoyggjum og Eysturoy til fólk við serligum tørvi, verður lagt upp fyri, at bústaðirnir lata upp í oktober 2014, ikki í juli 2013 sum upprunaliga ætlað. Dagsprísurin er 1.600 kr. og búfólkatalið verður mett at verða 25 - 32. Avsettar eru 4.672 tús.kr. í 2014, í 2015 verður játtanin hækkað við 14.017 tús.kr. til fult virksemi, soleiðis at samlaða játtanin verður 18,7 mió. kr. í 2015.

**Eldrarøkt**: Lagt er upp fyri fullum virksemi á Ellis- og røktarheiminum í Klaksvík 5.242 tús.kr. Samstundis, sum tað verður fult virksemi, verður ein sparing í heimatænastuni, sum er mett til 550 tús.kr. Játtanin til Klaksvíkar sjúkrahús er lækkað við 2.960 tús.kr. vegnma tess, at umskipanin frá dupultkømrum til einkultkømur verður framd í 2013.

Lagt er upp fyri at sparing innanfyri tøkni og umskipan av sambýlum, sum ásett er í karmum fyri 2013, heldur fram í 2014, 4.600 tús.kr.

Hagstova Føroya hevur mett um vøksturin í fólkatalinum í aldursbólkinum 67 ár og eldri. Almannaverkið hevur gjørt eina útrokning, sum vísir, at miðalkostnaðurin fyri heimatænastu til borgarar 67 ár og eldri, er umleið 15 tús. kr. árliga pr. fólk. Um verandi tænastustøði ikki skal versna, verður neyðugt at leggja fíggjarliga upp fyri hesum vøkstri, og verður tí 2014 framskrivað við 3,6 mió. kr., harav 700 tús.kr. eru rætting fyri 2013, í 2015 við 3,2 mió. kr., í 2016 við 3,6 mió. kr., í 2017 við 3,4 mió. kr. og í 2018 við 3,4 mió. kr.

Eldrarøktin verður kommunalt málsøki frá 1. januar 2014.

**Barnavernd**: Játtanin í 2014 er hækkað við 500 tús.kr., vegna príshækkingar í Danmark v.m.

**Barnaískoyti**: Metingar vísa, at játtanin hækkar umleið 2% árliga vegna økt virksemi.

**Dagpeningaskipanin**: Játtanin í 2014 er hækkað orsakað av øktum virksemi. Játtanin er síðani framskrivað við 1% árliga.

**Ansingarsamsýning**: Metingar um økt virksemi í 2014.

**Vanlig forsorg:** Játtanin til fyribils hjálp eftir § 9 verður lækkað við 1.000 tús.kr. í 2014. Játtanin í 2013 varð hækkað orsakað av at ein skiftisregla var ásett í 2013, soleiðis at tey, sum fáa forsorgarveitingar, fáa longri tíð at tillaga seg til nýtt veitingarstøði. Játtanin til meirútreiðslur vegna brekað barn, sambært § 17 er lækkað við 2.000 tús.kr. orsakað av minni virksemi. Samlaða játtanin til vanliga forsorg er framskrivað í 2015 vegna meting um økt virksemi.

**Arbeiðsfremjandi tiltøk**: Metingar um økt virksemi.

**Fólkapensjón**: Játtanin í 2014 er hækkað við 2,5 mió. kr. til fult virksemi orsakað av løgtingsmáli nr. 66/2012 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (Mótrokning avtikin millum fólkapensjónistar, giftir við ikki pensjónisti). Játtanin í 2014 og frameftir er eisini framskrivað sambært meting frá Hagstovu Føroya um øking í fólkatalinum í aldursbólkinum 67 ár og eldri.

**Fyritíðarpensjón**: Metingar vísa, at játtanin hækkar umleið 1% árliga vegna økt virksemi.

**Viðbót til ávísar pensjónistar**: Metingar vísa, at játtanin hækkar umleið 1% vegna økt virksemi.

**Sjúkratrygd**: Mett verður neyðugt at hækka játtanina í 2014 vegna økt virksemi. Virksemið verður eisini mett at økjast í 2016 og 2018

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**: Játtanin verður framskrivað í mun til játtanarkarm fyri 2013.

**Stuðul til feløg**: Játtanin verður framskrivað í mun til játtanarkarm fyri 2013.

**Stuðul til feløg hjá brekaðum**: Játtanin í 2014 er lækkað við 282 tús.kr., orsakað av at ongin játtan verður flutt frá Happadráttargrunninum, sum varð avtikin í 2013.

**Avtøka av Happadráttargrunninum**: Happadráttargrunnurin varð avtikin í 2013.

**Lán til ellis- og røktarheim í Vági**: Sambært lógini verður lánið afturgoldið yvir eitt 13 ára skeið við 1/156 parti hvønn mánað. Upphæddin í 2014 og frameftir er tillagað í mun til tað endaliga lánið.

## § 15 Innlendismál

**Talva A.16: Samlaðar framskrivingar fyri § 15 Innlendismál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **99.180** | **96.975** | **98.525** | **96.975** | **96.975** | **96.975** |
| *Indeks* | *100* | *98* | *99* | *98* | *98* | *98* |
| **Lógarb. játtan** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Stuðulsjáttan** | **6.045** | **5.345** | **5.245** | **4.745** | **4.645** | **4.545** |
| *Indeks* | *100* | *88* | *87* | *78* | *77* | *75* |
| **Tilsamans** | **105.525** | **102.620** | **104.070** | **102.020** | **101.920** | **101.820** |
| *Indeks* | *100* | *97* | *99* | *97* | *97* | *96* |

**Talva A.17: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 15 Innlendismál**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Ymsar útreiðslur | 950 | 550 | 2.100 | 550 | 550 | 550 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **950** | **550** | **2.100** | **550** | **550** | **550** |
| *Indeks* | *100* | *58* | *221* | *58* | *58* | *58* |
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Lánsafturgjald | -3.800 | -3.900 | -4.000 | -4.100 | -4.200 | -4.300 |
| Sandoyarætlan | 400 | 400 | 400 | 0 | 0 | 0 |
| Stuðul til havnir | 600 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **-2.800** | **-3.500** | **-3.600** | **-4.100** | **-4.200** | **-4.300** |
| *Indeks* | *100* | *125* | *129* | *146* | *150* | *154* |

**Ymsar útreiðslur**: Atlit verður tikið til eykaútreiðslur í sambandi við, at løgtingsval verður í seinasta lagi í 2015.

**Lánsafturgjald**: Talan er um avdráttir av einum annuitetsláni, sum IRF rindar landsstýrinum. Avdráttarparturin er vaksandi.

**Sandoyarætlan**: Ætlanin verður framd yvir árini 2013-2015, og fellur síðani burtur.

**Stuðul til havnir**: Í 2013 var latin stuðul til havnina í Vági, so at Norrøna kann sigla á Vág, meðan Smyril er í dokk.

## § 20 Inntøkur

**Talva A.19: Samlaðar framskrivingar fyri § 20 Inntøkur**

| *Tús. kr.* | **FL2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rentur | 46.000 | 54.000 | 60.000 | 72.000 | 80.000 | 87.000 |
| Inntøkuskattir | -2.006.590 | -2.058.275 | -2.059.424 | -2.108.820 | -2.159.720 | -2.212.170 |
| Avgjøld og tollur | -1.843.000 | -1.731.626 | -1.782.379 | -1.834.942 | -1.889.661 | -1.946.486 |
| Ymsar inntøkur | -56.500 | -72.745 | -74.027 | -76.248 | -78.536 | -80.892 |
| Heildarveiting | -632.200 | -632.200 | -632.200 | -632.200 | -632.200 | -632.200 |
| **Tilsamans** | **-4.492.290** | **-4.440.846** | **-4.488.030** | **-4.580.210** | **-4.680.117** | **-4.784.748** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *100* | *102* | *104* | *107* |

**Talva A.20: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 20 Inntøkur**

| *Tús. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ógreinað:** | | | | | | |
| Rentur at gjalda | 130.000 | 110.000 | 133.000 | 156.000 | 171.000 | 187.000 |
| Rentuinntøkur av innistandandi | -20.000 | -39.000 | -56.000 | -67.000 | -74.000 | -83.000 |
| Aðrar rentur | -3.000 | -3.000 | -3.000 | -3.000 | -3.000 | -3.000 |
| Avlop úr Danmarks Nationalbank | -14.000 | -14.000 | -14.000 | -14.000 | -14.000 | -14.000 |
| **Rentur tilsamans** | **93.000** | **54.000** | **60.000** | **72.000** | **80.000** | **87.000** |
| *Indeks* | *100* | *58* | *65* | *77* | *86* | *94* |
| | | | | | | |
| Vanligur landsskattur | -1.253.000 | -1.273.080 | -1.300.378 | -1.330.475 | -1.361.613 | -1.393.826 |
| Kolvetnisskattur, persónar | 0 | -15.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Felagsskattur | -140.000 | -153.772 | -137.785 | -141.919 | -146.176 | -150.562 |
| Kolvetnisskattur, feløg | -10.000 | -10.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tilfeingisskattur | -13.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kapitalvinningsskattur | -100.000 | -103.000 | -106.090 | -109.273 | -112.551 | -115.927 |
| Avgjald av kapitaleftirlønum | -45.000 | -54.000 | -57.000 | -60.000 | -63.000 | -66.000 |
| Skattur av pensjónsinngjøldum | -230.000 | -226.170 | -232.955 | -239.944 | -247.142 | -254.556 |
| Arvagjøld | -7.000 | -6.903 | -7.110 | -7.324 | -7.543 | -7.770 |
| Gjald til Heilsutrygd | -115.650 | -117.013 | -118.768 | -120.550 | -122.358 | -124.193 |
| Barsilsgjald | -90.100 | -96.496 | -96.496 | -96.496 | -96.496 | -96.496 |
| Gjald til Búnaðarstovuna | -2.840 | -2.840 | -2.840 | -2.840 | -2.840 | -2.840 |
| **Inntøkuskattir tilsamans** | **-2.006.590** | **-2.058.275** | **-2.059.424** | **-2.108.820** | **-2.159.720** | **-2.212.170** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *103* | *105* | *108* | *110* |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Meirvirðisgjald | -1.320.000 | -1.306.300 | -1.344.293 | -1.383.713 | -1.424.896 | -1.467.778 |
| Tollavgjøld | -34.000 | -38.051 | -39.193 | -40.369 | -41.580 | -42.827 |
| Punktgjøld | -180.000 | -188.504 | -194.159 | -199.984 | -205.983 | -212.163 |
| Lønhæddargjald | -41.000 | -36.741 | -37.843 | -38.979 | -40.148 | -41.352 |
| Brennioljugjald | -65.000 | -67.747 | -69.779 | -71.873 | -74.029 | -76.250 |
| Avgjald á fiskatilfeingi | -107.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Framleiðsluavgjøld | -22.000 | -22.416 | -23.088 | -23.781 | -24.494 | -25.229 |
| Skrásetingargjald | -95.000 | -97.850 | -100.786 | -103.809 | -106.923 | -110.131 |
| Vegskattur (Vektgjald) | -88.000 | -93.446 | -96.250 | -99.137 | -102.111 | -105.175 |
| Ferðaavgjald | -13.000 | -11.000 | -11.330 | -11.670 | -12.020 | -12.381 |
| Umhvørvisavgjald á smyrjiolju | -3.000 | -2.666 | -2.746 | -2.828 | -2.913 | -3.001 |
| Tinglýsingargjald | -20.000 | -20.271 | -20.879 | -21.505 | -22.150 | -22.815 |
| Endurrindan av keyps-MVG | 145.000 | 153.366 | 157.967 | 162.706 | 167.587 | 172.615 |
| **Avgjøld og tollur** | **-1.843.000** | **-1.731.626** | **-1.782.379** | **-1.834.942** | **-1.889.661** | **-1.946.486** |
| *Indeks* | *100* | *94* | *97* | *100* | *103* | *106* |
| | | | | | | |
| Útluting úr Fíggingargrunninum | 0 | -10.000 | -25.000 | -25.750 | -26.523 | -27.318 |
| Útluting frá almennum partafeløgum | -41.500 | -42.745 | -44.027 | -45.348 | -46.709 | -48.110 |
| Aðrar inntøkur | -15.000 | -20.000 | -5.000 | -5.150 | -5.305 | -5.464 |
| **Ymsar inntøkur** | **-56.500** | **-72.745** | **-74.027** | **-76.248** | **-78.536** | **-80.892** |
| *Indeks* | *100* | *129* | *131* | *135* | *139* | *143* |
| | | | | | | |
| Heildarveiting o.t. | -632.200 | -632.200 | -632.200 | -632.200 | -632.200 | -632.200 |
| | | | | | | |
| **Tilsamans** | **-4.445.290** | **-4.440.846** | **-4.488.030** | **-4.580.210** | **-4.680.117** | **-4.784.748** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *101* | *103* | *105* | *108* |

**Rentur at gjalda:** Fortreytirnar eru metta gongdin í landskassaskuldini og í rentustøðinum.

**Rentuinntøkur av innistandandi:** Fortreytirnar eru metta gongdin í fíggjarogn landskassans og í rentustøðinum.

Skattainntøkurnar eru framskrivaðar við 3 % nominelt virði, uttan har frávik eru gjørd:

**Vanligur Landsskattur:** Roknskaparúrslitið fyri 2012 var ikki so gott sum væntað. Hetta er orsøkin til, at metta inntøkan fyri 2013 er nakað lægri enn ásett í fíggjarlógaruppskotinum. Broytingin hevur ávirkan á seinni ár. Landsskatturin er lækkaður eftir 2014 fyri at leggja upp fyri, at nominellur lønarvøkstur ikki er roknaður á rakstrarsíðuni eftir 2014.

**Kolvetnisskattur, persónar:** Inntøkurnar eru mettar út frá ætlaðum leitivirksemi í 2013 og 2014.

**Felagsskattur**: Størri skattur væntast í 2014 vegna lækking av aligoymslum, annars verður framskrivað sum vanligt.

**Kolvetnisskattur, feløg:** Inntøkurnar eru mettar út frá ætlaðum leitivirksemi árini 2012 - 2014.

**Tilfeingisskattur:** Sambært galdandi lóg fellur tilfeingis/loyvisskatturin burtur við ársskifti 2013-2014.

**Avgjald av kapitaleftirlønum:** Seinastu árini hevur hesin postur á fíggjarlógini verið skjótt vaksandi. Í 2013 er inntøkan mett til 45 mió.kr. Roknað er við einum árligum vøkstri árini 2013 – 2018.

**Gjald til Heilsutrygd:** Við støði í roknskapartølunum fyri 2012 eru inntøkurnar framskrivaðar við 1,5%. Hækkingin er mótsvarað av framskrivaðari hækking á kontuni fyri Heilsutrygdarveitingar á § 11 Heilsumál.

**Barsilsgjald**: Barsilsgjald er framskrivað við 3% í 2013 og 2014, og verður síðani hildið á sama støði fyri at samsvara við kontuna fyri Barsilsgjald á § 6 Vinnumál.

**Gjald til Búnaðarstovuna**: Gjaldið til Búnaðarstovuna er 2.840 tús. kr. um árið.

**Meirvirðisgjald:** Roknskaparúrslitið fyri 2012 var ikki so gott sum væntað. Hetta er orsøkin til, at metta inntøkan fyri 2013 er lægri enn ásett í fíggjarlógaruppskotinum.

**Avgjald á fiskatilfeingi:** Sambært galdandi lóg fellur skatturin burtur við ársskifti 2013-2014. Upphædd viðv. fiskatilfeingi er sett á sum tiltak 2014 og fram (sí appendiks 3).

**Ferðaavgjald:** Avgjaldið verður mett at lækka 3 mió. kr. frá 2013 til 2014 grundað á lógaruppskot, ið lagt er fyri Løgtingið.

**Útluting úr Fíggingargrunninum:** Roknað verður við 3 mió. kr. í útluting í 2013, 10 mió. kr. í 2014 og síðani 25 mió. kr., vaksandi við 3% um árið.

**Aðrar inntøkur**: Roknað verður við 20 mió kr. í 2014, men er framskrivingin sett til at falla frá 2015, av tí at verandi skipan við víddargjaldi til oljufeløg gongur út.

# APPENDIKS 2: RAKSTRAR- OG INNTØKUTILTØK

## § 2 Løgmansfyrisitingin

Rakstrartiltøk árini 2014 til 2018 fyri § 2 Løgmansfyrisitingina:

**Talva A2.1: Tiltøk fyri § 2 Løgmansfyrisitingin 2014-2018**

| *Tús. kr.* | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Framskrivað játtan** | 46.300 | 46.300 | 46.300 | 46.300 | 46.300 | 46.300 |
| **Tiltøk:** | | | | | | |
| Rakstrartillagingar | | 0 | 0 | 1.400 | 1.800 | 1.800 |
| Alment innkeyp | | 69 | 138 | 208 | 208 | 208 |
| Savna miðfyrisitingina* | | 0 | 5.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **69** | **5.138** | **11.608** | **12.008** | **12.008** |
| **Játtan aftaná tiltøk** | | **46.231** | **41.162** | **34.692** | **34.292** | **34.292** |
| *Indeks* | | *100* | *89* | *75* | *74* | *74* |

**Tiltakið skal vera tvørgangandi, t.e. sparingin er fyri allar rakstrargreinar á fíggjarlógini*

Útgreinað einstøk tiltøk:

### 1. Rakstrartillagingar

*Endamál*
Spart og tillagað verður í virkseminum á § 2 Løgmansfyrisitingin fyri 1,4 mió. kr. í 2016, og síðani 400 tús.kr. afturat í 2017.

*Fíggjarlig ávirkan*
Tey fyrstu árini er eingin ávirkan, meðan sparing verður frá 2016 og fram.

*Avleiðingar*
Rakstrarvirksemið á § 2 Løgmansfyrisitingin minkar í 2016 og fram.

*Framferð*
Verður gjørt við tillagingum av rakstrinum.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Rakstrartillagingar | 0 | 0 | 1.400 | 1.800 | 1.800 |

## 2. Alment innkeyp

*Endamál*
Nýggi almenni innkeypspolitikkurin skal hava við sær sparingar í almenna rakstrinum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Fíggjarliga avleiðingin er, at almenna útreiðslustøði lækkar, ætlandi uttan at tænastustøðið lækkar.

*Avleiðingar*
Útreiðslustøðið hjá tí almenna lækkar.

*Framferð*
Verður gjørt við nýggjum mannagongdum viðv. almennum innkeypi.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Alment innkeyp | 69 | 138 | 208 | 208 | 208 |

## 3. Savna miðfyrisitingina

*Endamál*
Endamálið er at skipa landsfyrisitingina av nýggjum soleiðis, at arbeiðið kann leggjast til rættis meira rationelt og at meira kann fáast fyri minni, umframt at styrkja fakliga umhvørvið.

Talan er um tvørgangandi verkætlan, tvs. at løgmaður varðar av at fáa verkætlanina framda, men skal sparingin vera tvørgangandi fyri øll aðalráðini.

*Fíggjarlig ávirkan*
Landsfyrisitingin kostar í dag 96 mió.kr. Hesin kostnaður er býttur út á 8 stjórnarráð, ið eru plaserað ymiska staðni í býnum, og sum hvørt sær eru sera lítlar organisatiónir. Flestu stjórnarráðini hava minni enn 20 starvsfólk. Hetta ger, at arbeiðið kann gerast ineffektivt, og lutfalsvís ov nógv orka fer til umsiting heldur enn til myndugleika og ráðsuppgávur. Ætlanin er at endurskoða verandi bygnað og gera uppskot til ein nýggjan bygnað, ið kann stuðla undir eina rationalisering av virkseminum í landsfyrisitingini. Uppskotið verður eisini at fevna um uppskot til, hvussu landsfyrisitingin kann húsast soleiðis at fult virði kann fáast av eini bygnaðarbroyting. Løgmansstjórin og aðalstjórin í fíggjarmálum standa fyri arbeiðinum.

*Avleiðingar*
Har tað verður neyðugt, fáa starvsfólkini tillagað sína starvslýsing samsvarandi nýggja bygnaðin, og landsstýrisfólkini við teirra starvsfólkum koma at húsast tætt upp at hvør øðrum, helst í sama bygningi.

*Framferð*
Verður gjørt við tillagingum av bygnaðinum.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. | Savna miðfyrisitingina | 0 | 5.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |

## § 3 Fíggjarmál

Rakstrartiltøk árini 2014 til 2018 fyri § 3 Fíggjarmál.

**Talva A2.2: Tiltøk fyri § 3 Fíggjarmálaráðið 2014-2018**

| *Tús. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Framskrivað játtan** | 300.916 | 298.545 | 301.559 | 300.417 | 304.925 | 309.026 |
| **Tiltøk:** | | | | | | |
| 1. Rentustuðul lækkast til 30% í 2018 | | 1.750 | 5.250 | 10.500 | 14.000 | 17.500 |
| 2. Alment innkeyp | | 382 | 764 | 1.146 | 1.146 | 1.146 |
| 3. Effektivisering hjá TAKS | | 1.500 | 2.000 | 2.000 | 2.500 | 2.500 |
| 4. Útgjaldsskipan* | | 0 | 0 | 3.500 | 3.500 | 3.500 |
| 5. Útveitan* | | 0 | 5.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **3.632** | **13.014** | **27.146** | **31.146** | **34.646** |
| **Játtan aftaná tiltøk** | | **294.913** | **288.545** | **273.271** | **273.779** | **274.380** |
| *Indeks* | | *98* | *96* | *91* | *91* | *91* |

**Tiltakið skal vera tvørgangandi, t.e. sparingin er fyri allar rakstrargreinar á fíggjarlógini*

Útgreinað einstøk tiltøk:

### 1. Rentustuðul lækkast til 30% í 2018

*Endamál*
Rentustuðul verður veittur sambært løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur. Í løgtingslóg nr. 171 frá 22. desember 2009 varð avgjørt, at stuðulin skuldi minka frá 40% í 2009 til 35% í 2014, harav kommunurnar lata 15,5 %-stig av rentustuðlinum. Ætlanin er at lækka rentustuðulin, so at hann er 34,5% í 2014, 33,5% í 2015, 32% í 2016, 31% í 2017 og 30% í 2018.

*Fíggjarlig ávirkan*
Stuðulin til rentuútreiðslur verður í 2014, tá verandi lækking til 35% er framd, mettur til 122,5 mió. kr., harav kommunurnar rinda 54,25 mió. kr.

Hvørt %-stig, ið rentustuðulin lækkar, gevur landskassanum eina sparing á 3,5 mió. kr. við verandi rentustøði (við hægri rentustøði hevði sparingin verið størri). Sparingin er sostatt 1,75 mió. kr. í 2014 og 17,5 mió. kr. í 2018.

*Avleiðingar*
Rentustuðulin lækkar til 30% í 2018.

*Framferð*
Verður gjørt við lógarbroyting.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Rentustuðul lækkast til 30 % í 2018 | 1.750 | 5.250 | 10.500 | 14.000 | 17.500 |

## 2. Alment innkeyp

*Endamál*
Nýggi almenni innkeypspolitikkurin skal hava við sær sparingar í almenna rakstrinum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Fíggjarliga avleiðingin er, at almenna útreiðslustøðið lækkar, ætlandi uttan at tænastustøðið lækkar.

*Avleiðingar*
Útreiðslustøðið hjá tí almenna lækkar.

*Framferð*
Verður gjørt við nýggjum mannagongdum viðv. almennum innkeypi.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Alment innkeyp | 382 | 764 | 1.146 | 1.146 | 1.146 |

## 3. Effektivisering hjá TAKS

*Endamál*
Verkætlan at seta talgildan roknskap í verk er sett í verk av Fíggjarmálaráðnum, og verður lógaruppskot væntandi lagt fyri Løgtingið í heyst um krav um innlating av talgildum roknskapum fyri roknskaparárið 2013. Harafturat verða effektiviseringstiltøk sett í verk fyri TAKS.

*Fíggjarlig ávirkan*
Fíggjarliga úrslitið verður sparing og effektivisering av virkseminum hjá TAKS.

*Avleiðingar*
Um TAKS kann móttaka roknskapir talgilt heldur enn á pappíri, ber til at spara 1 mió. kr. árliga. Vegna effektivisering verður spart í rakstri 0,5 mió. kr. í 2014, og sama upphædd í 2015 og 2017.

*Framferð*
Fyri at at røkka sparingini, sum talgildur roknskapur hevur við sær, er neyðugt við lógarverki, kravseting av fíluformati o.a. Verkætlan er í gongd hesum viðvíkjandi.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. | Effektivisering hjá TAKS | 1.500 | 2.000 | 2.000 | 2.500 | 2.500 |

## 4. Útgjaldsskipan

*Endamál*
Samskipa útgjaldsskipanir við almennum endamáli undir einum stovni.

Ein yvirskipað meting er, at peningur er at spara, um vit samskipa nakrar útgjaldskassar við almennum endamáli.

Talan er um tvørgangandi verkætlan, tvs. at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum varðar av at fáa verkætlanina gjøgnumførda í samráð við løgmann, ið varðar av málsøkjabýtinum, men verður sparingin tvørgangandi fyri øll aðalráð.

*Fíggjarlig ávirkan*
At spardar verða 2 til 5 mió.kr. á fíggjarlógini tá ið verkætlanin er framd.

*Avleiðingar*
Vit hava ídag fleiri almennar útgjaldsskipanir í ymiskum stovnum og verkum. Almannaverkið, Útbúgvingarstuðul, ALS, Tænastumannapensjónir, Trygdargrunnur, Barsilskipan, AMEG og Heilsutrygd.

Metingin er, at tað kostar okkurt um 20 mió. kr. at umsita útgjaldingar. Talið er kanska heldur í lægra lagi. Eins óvist tað er at meta um talið, eins óvist er tað at meta um, hvørjir rationaliseringsmøguleikar eru í hesum. Men onkrir møguleikar eru, tí royndir vísa, at sparingar eru í stórrakstri í mun til í smáar sárbærar funktiónir. Siga vit 10 til 20%, sum kann vera: Umsiting av felags stamdátum t.d. ein bankkonta, felags eftirlit, felags heimasíður, felags skipanir t.d. mótvegis borgaranum, verri at fremja undandrátt, tí alt liggur undir sama myndugleika og felags kt-fólki.

Sparingin upp á sikt er kanska ímillum 2 til 5 mió.kr.

Skulu almennar útgjaldingar savnast, so er neyðugt at gera nógv neyvari kanningar av uppgávuni og at skipa gjøgnumførsluna sum eina størri verkætlan.

Tó er neyðugt at samskipa umsitingina av samlaðu útgjaldingarfunktiónini við ein størri stovn, sum hevur royndir á økinum. Stovnarnir, sum talan kann vera um, verða nevndir í raðfestari raðfylgju: Samskipan við nýggju skipanina hjá Almennaverkinum, samskipan við løn, BSL o.a. á Gjaldstovuni og uppbygging av felags samskipan við nýggju Taksskipanina.

Fíggjarmálaráðið hevur gjørt eina meting av núverandi umsitingum og tali á starvsfólkum, og mest áhugaverda er, hvussu ymiskt almenna tilfeingið verður nýtt. Hetta er ein greið ábending um, at jú størri stovnar, jú munadyggari eru teir.

Omanfyri er nevnt ein sparings upp á 2 mió. kr. Men ivaleyst liggja heilt onnur perspektiv í eini slíkari organisatión, sum kunnu geva nógv størri samfelagslig avkast, sum er nógv meira áhugaverd enn tær 2 mió. kr., tí vit á einum staði fáa samlað yvirlit yvir, hvat vit rinda borgaranum í ymsum flytingarinntøkum.

*Framferð*
Fíggjarmálaráðið tekur stig til at verkætlanin verður framd.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. | Útgjaldsskipan | 0 | 0 | 3.500 | 3.500 | 3.500 |

## 5. Útveitan

### Endamál

Greiningar vísa, at útveitan av almennum uppgávum loysir seg undir røttum fortreytum. Sparingar kunnu vera 20% og 30% av kostnaðinum. Útveitan hevur jaliga ávirkan á førleikan í vinnuni og meira dynamikkur verður skaptur í búskapinum.

Útvald øki verða vald at royna sum útveitanarøki og skulu uppgávurnar kosta 10 til 20 mió. kr. samanlagt um árið.

Fortreytirnar eiga fyrst og fremst at vera:

1) At talan ikki er um myndugleikauppgávur
2) At fleiri enn ein veitari kann bjóða uppá uppgávuna
3) At output og mongdin á útveitan kann greinast

Talan er um tvørgangandi verkætlan, tvs. at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum varðar av at fáa verkætlanina gjøgnumførda í samráð við løgmann, ið varðar av málsøkjabýtinum, men verður sparingin tvørgangandi fyri øll aðalráð.

*Fíggjarlig ávirkan*
Landskassin er mettur at spara – í fyrsta umfari – 5 mió. kr. í 2015 og síðani eini 10 mió. kr. árliga frá 2016.

*Avleiðingar*
Starvsfólk, sum í dag arbeiða við nevndu økjum missa arbeiðið, tá ið uppgávan verðu útveitt. Talan er um at flyta starvsfólk frá almenna til privata geiran.

*Framferð*
Verður gjørt við at veita fleiri uppgávur út.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. | Útveitan | 0 | 5.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |

## § 5 Fiskivinnumál

Rakstrartiltøk árini 2014 til 2018 fyri § 5 Fiskivinnumál.

**Talva A2.3: Tiltøk fyri § 5 Fiskivinnumál 2014-2018**

| *Tús. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Framskrivað játtan** | 149.900 | 150.504 | 152.104 | 150.504 | 150.504 | 150.504 |
| **Tiltøk:** | | | | | | |
| 1. Leggja FVE, MRCC og Tilbúgving saman | | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 2. Meirinntøkur á Havstovuni | | | | 800 | 2.000 | 2.000 |
| 3. Effektivisering av innkeypi og útbjóðingum | | | 1.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| 4. Uttanhýsis fígging av landbúnaðargransking | | 500 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 5. Automatisering og rationalisering av fiskiloyvisumsiting | | 500 | 600 | 600 | 800 | 800 |
| 6. Meira uttanhýsisfígging til fisikivinnugransking | | 700 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 7. Nýtt havrannsóknarskip | | 0 | 0 | -12.000 | -12.000 | -12.000 |
| 8. Alment innkeyp | | 227 | 454 | 681 | 681 | 681 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **2.927** | **5.054** | **-4.919** | **-3.519** | **-3.519** |
| **Játtan aftaná tiltøk** | | **147.577** | **147.050** | **155.423** | **154.023** | **154.023** |
| *Indeks* | | *98* | *98* | *104* | *103* | *103* |

Útgreinað einstøk tiltøk á § 5:

### 1. Fiskiveiðieftirlitið, MRCC og Tilbúgvingarstovnurin verða løgd saman.

*Endamál*
Minka um dupultfunktiónir og skipa arbeiðið betur.

*Lýsing*
Á FVE og MRCC eru fleiri fólk, ið ganga vakt. Við at samskipa vaktarætlanirnar átti at borið til at minkað um útgoldna yvirtíð og vaktargjald. Vaktgangandi á MRCC og manning á Brimli kunnu arbeiða í rotatión fyri at betra um førleikan og samskifti á báðum økjum. Harumframt verður eisini arbeitt við at umskipa fyrisitingina av fiskiloyvum.

*Avleiðing*
Hetta skuldi ikki fingið negativa ávirkan á tænastuna.

*Fíggjarlig ávirkan*
Hetta er trupult at meta um, men ein leyslig meting sigur millum 3 - 4 mió. kr. árini 2012-14. Viðmerkjast skal at 2.400 tkr. eru spard árini 2012-13.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Fiskiveiðieftirlitið, MRCC og Tilbúgvingarstovnurin løgd saman | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |

**2. Meirinntøkur á Havstovuna**

*Endamál*
At fáa granskarar uttanlands til Føroyar at granska, og harvið skapa virksemi og førleikamenning í Føroyum.

*Lýsing*
Mett verður at nýggja havrannsóknarskipið gevur møguleika fyri at skipið kann leigast út til útlendskar granskingarstovnar, kanska í samstarvi við Havstovuna. Á henda hátt kunnu útlendskir granskingarstovnar verða við til at fíggja partar av rakstrinum hjá nýggja havrannsóknarskipinum.

*Avleiðing*
Hetta skuldi lætt um raksturin av nýggja havrannsóknarskipinum samstundis sum granskingarførleikin á Havstovuni veksur.

*Fíggjarlig ávirkan*
Hetta er trupult at meta um, men ein leyslig meting sigur uml. 3 mió. kr. fram til 2018.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Meirinntøkur til Havstovuna | | 1.000 | 1.800 | 3.000 | 3.000 |

**3. Effektivisering av innkeypi**

*Endamál*
Bjóða ymsar tænastur út.

*Lýsing*
Mett verður at møguligt er at spara í rakstrinum við at bjóða fleiri tænastur út.

*Avleiðingar*
Tænasturnar verða á sama støði sum í dag.

*Fíggjarlig ávirkan*
Mett verður at 2 mió. kr. kann sparast við at bjóða ymsar tænastur út.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Effektivisering av innkeypi | | 1.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |

### 4. Uttanhýsis fígging av landbúnaðargransking

*Endamál*
Vaksa um landbúnaðargranskingina.

*Lýsing*
Í løtuni fer landbúnaðargransking fram á Búnaðarstovuni umvegis játtanina til "almennar royndir". Við umskipanini av Búnaðargrunninum er latið upp fyr,i at grunnurin kann lata stuðul til granskingarverkætlanir innan landbúnaðin. Almennar royndir kunnu tá umskipast til meira at taka ein samskipandi leiklut í landbúnaðargranskingini, og fíggingin meira verður hildin uttanfyri landskassan.

*Avleiðingar*
Meira gransking innan landbúnaðin fyri ein lægri kostnað fyri landskassan.

*Fíggjarlig ávirkan*
Mett verður at í hvussu er 1.000 tús. kr. kunnu fáast til vega av uttanhýsis fígging til granskingar-verkætlanir.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. | Uttanhýsis fígging av landbúnaðargransking | 500 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |

### 5. Effektivisering og automatisering av umsitingini av fiskiloyvum

*Endamál*
Automatisera og effektivisera umsitingina av fiskiloyvum.

*Lýsing*
Verkætlan verður sett í gongd at effektivisera og automatisera fiskiloyvisumsitingina. Hetta fevnir um fleiri átøk:

- Gera lógarverkið einfaldari at umsita
- Leggja umsiting av fiskiloyvum til Fiskiveiðieftilitið
- Arbeiða móti at gera tað møguligt hjá fiskimonnum og reiðarum fyri sjálvavgreiðslu

*Avleiðing*
Hetta skuldi betra um tænastuna.

*Fíggjarlig ávirkan*
Hetta er trupult at meta um, men ein leyslig meting sigur at 1.000 tkr. kunnu sparast fram til 2018. At sparingin í fyrstu syfti ikki verður størri kemst av at nakrar útreiðslur stava frá hesi umlegging – m.a. skulu KT-skipanir gerast til endamálið

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. | Umsitingin av fiskiloyvum | 500 | 600 | 600 | 800 | 800 |

## 6. Uttanhýsis fígging av fiskivinnugransking

*Endamál*
Umskipa fiskivinnugranskingina.

*Lýsing*
Í løtuni fer fiskivinnugransking fram umvegis játtanina til fiskivinnuroyndir. Mett verður at møguligt er at vaksa um fremmandafíggingina av granskingarverkætlanunum.

*Avleiðingar*
Meira gransking innan fiskivinnuna fyri ein lægri kostnað fyri landskassan.

*Fíggjarlig ávirkan*
Mett verður, at ið hvussu er 800 tús. kr. kunnu fáast til vega av uttanhýsis fígging til granskingarverkætlanir.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. | Fígging av fiskivinnugransking | 700 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |

## 7. Leiga havrannsóknarskip

*Endamál*
Landið leigar havrannsóknarskip sambært marknaðartreytum við avmarkaðari tíðarbinding. Skipið kann brúkast til onnur endamál enn havrannsókn, og eigarin fær tí aðrar inntøkur. Skipið gerst meira effektivt, og landið fær útveitt uppgávuna fyri lægri kostnað.

*Fíggjarlig ávirkan*
Nýtt havrannsóknarskip verður betur gagnnýtt um tað kann brúkast av øðrum eisini. Landið skal tí upp á sikt fáa betri fíggjarligt úrslit av skipanini.

*Avleiðingar*
Avleiðingarnar skulu vera, at landið ger sínar havrannsóknir bíligari, enn um tað sjálvt keypti og útgjørdi skipið.

*Verksetan*
Fiskimálaráðið ger innleiðandi kanningar komandi tíðina. Lógaruppskot verður lagt fyri Tingið, sum heimilar landsstýrismanninum at gera avtalu um útveitan (leigu) av havrannsóknarskipi. Tað er alneyðugt, at talan ikki verður um fíggjarliga leigu, sum bindur landskassan óneyðugt fíggjarliga ella gerst ein dýrari loysn, enn um landið sjálvt hevði bygt/keypt skipið.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. | Leiga havrannsóknarskip | 0 | 0 | -12.000 | -12.000 | -12.000 |

## 8. Alment innkeyp

*Endamál*
Nýggi almenni innkeypspolitikkurin skal føra við sær sparingar í almenna rakstrinum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Fíggjarliga avleiðingin er, at almenna útreiðslustøði lækkar, ætlandi uttan at tænastustøðið lækkar.

*Avleiðingar*
Útreiðslustøði hjá tí almenna lækkar.

*Verksetan*
Verður gjørt við nýggjum mannagongdum viðv. almennum innkeypi.

| **Nr.** | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---:|---:|---:|---:|---:|
| 8. | Alment innkeyp | 227 | 454 | 681 | 681 | 681 |

## § 6 Vinnumál

Rakstrartiltøk árini 2014 til 2018 fyri § 6 Vinnumál.

**Talva A2.4: Tiltøk fyri § 6 Vinnumál 2014-2018**

| *Tús. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Framskrivað játtan** | 302.804 | 301.709 | 300.609 | 300.609 | 300.609 | 300.609 |
| **Tiltøk:** | | | | | | |
| 1. Jarðfeingi | | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 2. Miðsavna raksturin av skipaflotanum hjá landinum | | 3.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| 3. SSL, Hækka ferðaseðlaprísir 10 % | | 3.200 | 3.200 | 3.200 | 3.200 | 3.200 |
| 4. SSL, annað | | 0 | 1.200 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |
| 5. Minking í stuðulsskipanum | | 1.600 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 6. Alment innkeyp | | 300 | 600 | 900 | 900 | 900 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **8.600** | **10.500** | **10.800** | **10.800** | **10.800** |
| **Játtan aftaná tiltøk** | | **293.109** | **290.109** | **289.809** | **289.809** | **289.809** |
| *Indeks* | | *97* | *96* | *96* | *96* | *96* |

Útgreinað einstøk tiltøk á § 6 vinnumál:

### 1. Jarðfeingi

*Endamál og fíggjarlig ávirkan*
Granskingarverkætlanir skulu í størri mun fíggjast við stuðuli/inntøkum. Jarðfeingi kann finna øktar inntøkur til gransking á uml. 0,5 mió kr. í 2014 og komandi árini.

| Nr. | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Jarðfeingi | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |

### 2. Miðsavnan av rakstrinum av skipaflotanum hjá landinum(“landsreiðarí”)

*Endamál*
Arbeitt verður við at kanna hvussu og um tað er rationelt og administrativt skilagott at skipa eitt landsreiðarí sum fær ábyrgdina av øllum skiparakstrinum hjá landinum. Ein arbeiðsbólkur arbeiðir við málinum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Rationalisera raksturin við uml. 15% upp á sikt:

| Nr. | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Landsreiðarí | 3.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |

### 3. Strandfaraskip Landsins

*Endamál*
Hækka ferðaðseðlaprísir og farmaprísir við 10%.

*Fíggjarlig ávirkan*

- 10% hækking av ferðaseðlum PAX 1.000 tkr
- 10% hækking privat akfør minni enn 5 m 1.200 tkr
- 10% hækking vinnuakfør og farmur 1.000 tkr

Í alt 3.200 tkr

| **Nr.** | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. | SSL øktar inntøkur | 3.200 | 3.200 | 3.200 | 3.200 | 3.200 |

### 4. Nýggj nólsoyarferja

*Endamál/ fíggjarlig ávirkan*
Klárt er at bjóða projekteringina til nýggju ferjuna út, bíðað verður eftir at Tingið skal viðgera uppskot til verklagslóg. Vinnumálaráðið væntar, at uppskotið verður samtykt og at ætlaða sparingin 1,2 mió. kr. verður rokkin í 2015.

| Nr. | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. | Nólsoyarferja | - | 1.200 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |

### 5. Minking í stuðulsskipanum

*Endamál/fíggjarlig ávirkan*
Ymsar stuðulsskipanir á § 6 Vinnumál verða lækkaðar fyri at røkka játtanarkamin.

| **Nr.** | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. | Minking í stuðulsskipanum | 1.600 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |

### 6. Alment innkeyp

*Endamál*
Nýggi almenni innkeypspolitikkurin skal hava við sær sparingar í almenna rakstrinum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Fíggjarliga avleiðingin er, at almenna útreiðslustøðið lækkar, ætlandi uttan at tænastustøðið lækkar.

*Avleiðingar*
Útreiðslustøðið hjá tí almenna lækkar.

*Verksetan*
Verður gjørt við nýggjum mannagongdum viðv. almennum innkeypi.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. | Alment innkeyp | 300 | 600 | 900 | 900 | 900 |

## § 7 Mentamál

Rakstrartiltøk árini 2014 til 2018 fyri § 7 Mentamál.

**Talva A2.5: Tiltøk fyri § 7 Mentamál 2014-2018**

| *Tús. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Framskrivað játtan** | 937.154 | 951.155 | 959.316 | 966.560 | 973.863 | 976.863 |
| **Tiltøk:** | | | | | | |
| 1. Fólkaskúlaøkið | | 500 | 4.500 | 8.500 | 12.500 | 12.500 |
| 2. Miðnámsútbúgvingaøkið | | 2.000 | 6.300 | 11.300 | 15.300 | 15.300 |
| 3. Hægri útbúgvingar og gransking | | -1.000 | -1.300 | -1.300 | -1.300 | -1.300 |
| 4. Lestrarstuðulsskipanini | | 500 | 1.000 | 2.000 | 2.500 | 2.500 |
| 5. Mentanarstuðul | | 0 | -500 | -500 | -500 | -500 |
| 6. Annað og alment innkeyp | | 2.891 | 3.582 | 3.573 | 6.473 | 10.473 |
| 7. Stuðul til oyggjaleikir | | 0 | 0 | 0 | -2.000 | -4.000 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **4.891** | **13.882** | **23.573** | **32.973** | **34.973** |
| **Játtan aftaná tiltøk** | | **946.264** | **945.434** | **942.987** | **940.890** | **941.890** |
| *Indeks* | | *101* | *101* | *101* | *100* | *101* |

Útgreinað tiltøk á § 7 mentamál:

### 1. Fólkaskúlaøkið

*Endamál*
Endamálið er framhaldandi at skipa ein góðan nútíðar fólkaskúla fyri øll.

*Fíggjarlig ávirkan*
Broytingar skulu gerast í fólkaskúlabygnaðinum, soleiðis at tímar í størri mun verða tillutaðir til skúlaøki. Øll undirvísing í hvørjum øki verður síðan samskipað betur. Sernámsfrøðiliga virksemið í fólkaskúlanum skal styrkjast.

*Avleiðing*
Umskipan av galdandi skúlabygnaði, ið førir til færri flokkar, vil gera tað møguligt at lækka tímatalið til skúlarnar nakað, uttan at nerva dygdina í undirvísingini. Skipanin umfatar ikki skúlar á útoyggj. Økt sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum er bæði til gagns fyri tann einstaka næmingin, sum hevur tørv á hesum og fyri virksemi í skúlanum sum heild.

*Framferð*
Við at skipa skúlaøki ber til at tillaga fólkaskúlabygnaðin soleiðis, at tímar verða tillutaðir til øki, sum fara at skipa undirvísingina.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Fólkaskúlaøkið | 500 | 4.500 | 8.500 | 12.500 | 12.500 |

**2. Miðnámsútbúgvingaøkið**

*Endamál*
Endamálið er ein samanhangandi miðnámsútbúgvingarskipan, har góðir og fjølbroyttir møguleikar eru til ungdómin og tey, sum ætlað sær undir víðari útbúgving.

*Fíggjarlig ávirkan*
Broyttu miðnámsútbúgvingarskipanirnar og nýggju deplarnir geva møguleikar fyri sparingum innan rakstur, fyrisiting og at skipa útbúgvingarnar effektivari.
Nýggja yrkisútbúginvarskipanin, Tekniskt Yrkisnám, er ein samanrenning av verandi yrkisútbúgvingarskipan og SIT-skipanini. Skúlaskeiðini liggja nú í fastari kørmum og verða færri og longri. Málið við hesum er ein liðilig skipan, sum bæði er støðið undir yrkisútbúgvingum og gevur møguleika til víðari lesnaði.
Nýggja gymnasiala útbúgvingarskipanin, Breytaskipanin, ber í sær størri samrakstur millum útbúgvingarskipanir/-breytir. Við skúladeplunum ber til at hava ein skynsamari rakstur.

*Avleiðing*
Økti samraksturin millum útbúgvingarskipanirnar og nýggju deplarnir viðføra størri fjølbroytni í tilboðunum innan miðnámsútbúgvingarnar. Talan er um eina liðiligari skipan, so tilfeingið verður betri gagnnýtt. Nýggju útbúgvingarskipaninar og tað, at miðnámsskúlarnir verða útbygdir, fer eisini at hava við sær, at fleiri dýrar fyribils hølisloysnir ikki verða neyðugar, tá útbyggingarnar eru lidnar.

*Framferð*
Nýggju miðnámsútbúginvarskipanirnar verða settar í verk frá august 2013, men tað tekur 3 ár áðrenn nýggju skipanirnar eru fult verksettar. Tað fer eisini at taka tíð at skipa miðnáms-útbúgingardeplarnar bygnaðarliga.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Miðnámsútbúgvingaøkið | 2.000 | 6.300 | 11.300 | 15.300 | 15.300 |

## 3. Hægri útbúgvingar og gransking

*Endamál*
Økt raðfesting av hægri útbúgvingum og gransking hava til endamáls at styrkja útbúgvingartilboðini í Føroyum, minka fráflytingina og økja búskaparliga vøksturin í samfelagnum.

*Avleiðing*
Játtanin til hægri útbúgvingar og gransking innan fyri samlaða fíggjarkarmin á § 7 verður hækka nakað, umframt at avgerð er tikin um framhaldandi at taka lut í ES-granskingarskránni Horizon 2020, sum eisini umfatar innovatión.

*Framferð*
Játtanin til hægri útbúgving verður hækkað í 2014 og 2015, og peningur verður settur av til ES-granskingarsamstarvið.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. | Hægri útbúgvingar og gransking | -1.000 | -1.300 | -1.300 | -1.300 | -1.300 |

## 4. Lestrarstuðulsskipanin

*Endamál*
Vaksandi útreiðslurnar innan lestrarstuðulin verða tálmaðar.

*Lýsing*
Ætlanin er at umleggja ÚSUN-skipanina, soleiðis at ein partur av studninginum verður lagdur um til lán. Lánið skal rindast aftur, um so er, at tey lesandi, eftir eitt áramál, ikki koma heimaftur at búgva.

*Avleiðingar*
Lesandi, ið lesa uttanfyri Føroyar á útbúgvingarstovnum, har talan er um stórt skúlagjald, verða eggjað at flyta heimaftur.

*Fíggjarlig ávirkan*
Vøksturin til lestrarstuðul komandi árini verður tálmaður.

*Framferð*
Umrøddu sparingar fáa virknað frá august 2014.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. | Lestrarstuðulsskipanini | 500 | 1.000 | 2.000 | 2.500 | 2.500 |

## 5. Mentunarstuðul

*Endamál*
Betri skipaður mentanarstuðul skal stimbra mentanarumhvørvið í breiðum høpi

*Lýsing og avleiðingar*
Ætlanin er at gera umskipanir í mentanarstuðlinum, soleiðis at ymsu stuðulsskipanirnar í størri mun verða samskipaðar. Harafturt verður miðja eftir at økja stuðulsupphæddina, soleiðis at málið við játtanini verður rokkið, so væl sum gjørligt.

*Framferð*
Ætlanin er at seta á stovn eitt lista- og mentanarráð, sum skal tryggja fakliga ráðgeving og samskipa nýtsluna av játtanini.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. | Mentanarstuðul | 0 | -500 | -500 | -500 | -500 |

## 6. Annað og alment innkeyp

*Endamál*
Aðrar effektiviseringar og sparingar innan øll øki og meiri skipað og ódýrari alment innkeyp.

*Lýsing*
Gjørdar verða tillagingar í rakstrar- og stuðulsjáttanum.

*Avleiðing*
Neyðugt verður at tillaga ætlaða virksemið til eina lægri játtan.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. | Annað og alment innkeyp | 2.891 | 3.582 | 3.573 | 6.473 | 10.473 |

## 7. Stuðul til oyggjaleikir/ítróttur

*Endamál*
Oyggjaleikir vóru í Føroyum í 1989. Arbeitt hevur verið í fleiri ár fyri at fáa oyggjaleikatiltakið aftur til Føroyar. Sum ein liður í at stuðla fyrrireikingararbeiðinum her heima, er stuðul settur av til endamálið.

*Lýsing*
Fyri at kunna hava oyggjaleikir aftur í Føroyum, má nógv fyrireikingararbeiði gerast, serliga eru tað ítróttaannlegg, ið mugu gerast av nýggjum ella mennast, soleiðis at tey lúka tær treytir, ið verða settar av Oyggjaleikanevndini til slíkar karmar. Játtanin er ætlað til slík endamál.

*Avleiðingar*
Tað fer at hava eina mennandi ávirkan á alt okkara ítróttarøki at fáa oyggjaleikir aftur til Føroyar.

*Fíggjarlig ávirkan*
Stuðulin er hugsaður sum ein stuðul til ein Oyggjaleikagrunn, ið skal fyrireika ítróttarøki her heima at verða karmar um komandi oyggjaleikir í Føroyum.

*Framferð*
Stuðulin verður veittur í 2017 og 2018 við 2 mió. kr. hvørt ár.

| **Nr.** | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. | Stuðul til oyggjaleikir | 0 | 0 | 0 | -2.000 | -4.000 |

## § 11 Heilsumál

Rakstrartiltøk árini 2014 til 2018 fyri § 11 Heilsumál:

| Talva A2.6: Tiltøk fyri § 11 Heilsumál 2014-2018 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Tús. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
| **Framskrivað játtan** | 907.582 | 921.914 | 929.227 | 936.717 | 944.388 | 952.245 |
| **Tiltøk:** | | | | | | |
| 1. Umlegging á heilsuverkinum | | 2.700 | 11.050 | 20.500 | 27.500 | 32.100 |
| 2. Samanlegging av stovnum á primera heilsuøkinum | | 0 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 3. Umsiting av heilstrygdarveitingum | | 1.600 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 4. Ílegusavnið, eginfíggjaður rakstur | | 0 | 250 | 500 | 1.000 | 1.000 |
| 5. Heiluvágsframleiðslu, útflutningur | | 0 | 500 | 1.000 | 2.000 | 2.000 |
| 6. Alment innkeyp | | 400 | 800 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **4.700** | **16.100** | **26.700** | **35.200** | **39.800** |
| **Játtan aftaná tiltøk** | | **917.214** | **913.127** | **910.017** | **909.188** | **912.445** |
| *Indeks* | | *101* | *101* | *100* | *100* | *101* |

Útgreinað einstøk tiltøk á § 11 heilsumál:

### 1. Umlegging av virkseminum í heilsuverkinum

*Endamál*
At skerja tær dupultfunktiónir, sum í dag eru á sjúkahúsunum, uttan at tænasturnar verða niðurlagdar í Føroyum. Talan er í høvuðsheitum um størv og tólakeyp, men eisini aðrar rakstrarútreiðslur eru við. Harumframt verður lagt upp til at viðgera heilsuverkið í síni heild.

*Fíggjarlig ávirkan*
Eftir ætlan skal umleggingin hava við sær meira skynsama nýtslu av tilfeinginum í heilsuverkinum. Arbeiðið, hvussu umleggingin skal fremjast, er byrjað. Hetta verður eitt stórt og torført arbeiði, sum skal skipast væl. Heilsumálaráðið metir tí, at veruligar sparingar kunna ikki heintast inn fyrr enn í 2015, og at tann fulli ágóðin ikki fyrr enn í 2017. Orsakað av kravinum um sparingar verður talan um stórar avbjóðingar beinanvegin fyri at røkka málinum.

*Avleiðingar*
Funksjónir og harvið arbeiðspláss verða flutt ímillum ymsu partarnar í heilsuøkinum. Hetta hevur við sær, at onkur starvsfólk fáa aðrar uppgávur, og at samlaða starvsfólkatalið má lækka. Hugsast kann eisini, at nakrir borgarar fara at hava eitt sindur longri ferðing til og frá ávísum viðgerðum. Fakliga tænastan kann tó í minsta lagi væntast at vera á sama støði sum í dag, og borgararnir fáa eina meira líka atgongd til tænastuna.

*Verksetan*
At verkseta umleggingina eftir einum skipaðum leisti tekur eisini tíð. Sparingarnar av umleggingini komandi árini verða soleiðis:

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Umlegging av heilsuverkinum | 2.700 | 11.050 | 20.500 | 27.500 | 32.100 |

## 2. Samanlegging av stovnum á primera heilsuøkinum

*Endamál*
At samskipa økið betur við tí endamáli, at borgarin fær eina betri tænastu og eisini fær meira burturúr tí tilfeingi, sum verður nýtt til hesar tænastur.

*Fíggjarlig ávirkan*
Tann fíggjarliga sparingin verður mett til 500 tkr. um árið. Samanleggingin skal gerast eftir eini skipaðari tilgongd og fær ætlandi virknað í 2015.

*Avleiðingar*
Sparingin liggur í høvuðsheitum í samanlegging av KT-skipanum, journal og sparing í leiguútreiðslum. Møguliga skulu starvsfólk broyta arbeiðsstað.

*Verksetan*
Samanleggingin skal gerast eftir eini skipaðari tilgongd og fær tí ikki virknað fyrr enn í 2015.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Samanlegging av stovnum á primera heilsuøkinum | 0 | 500 | 500 | 500 | 500 |

## 3. Heilsutrygdarveitingar

*Endamál*
Farið er undir eina tilgongd at fáa ment talgildugu umsitingina av heilsutrygdarveitingunum. Hetta fer at styrkja eftirlitið og gera nýtsluna meiri gjøgnumskygda, soleiðis at tað gerst sjónligari, hvar nýtslan kann verða tálmað. Somuleiðis verður arbeitt við at broyta skipanina til veitingar í sambandi við hjálparráð og kostískoyti.

*Fíggjarlig ávirkan*
Umleggingin skal gerast eftir einum skipaðum leisti og væntast at fáa virknað í 2014.

*Avleiðingar*
Tænastur sum verða veittar frá Heilsutrygdarskipanini verða umskipaðar og dagførdar.

*Verksetan*
Ætlanin er at fara undir arbeiðið at talgilda størsta partin av virkseminum á stovninum, soleiðis at m.a. eftirlitið við veitingum frá skipanini verður styrkt. Harumframt verður regluverkið á økinum dagført.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. | Heilsutrygdarveitingar | 1.600 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |

## 4. Ílegusavnið, eginfíggjaður rakstur

*Endamál*
At fáa inntøkur til at fíggja virksemið hjá stovninum, soleiðis at landið fær ein part av síni íløgu í skipanina aftur.

*Fíggjarlig ávirkan*
Roknað verður við, at við at seta fokus á inntøkurnar, kann ein munandi fíggjarlig úrtøka væntast í framtíðini.

*Avleiðingar*
Ílegusavnið skal í størri mun arbeiða við marknaðarføring og sølu av upplýsingum og tænastum, ikki minst til útflutnings.

*Verksetan*
Miðað verður fram ímóti, at inntøkurnar skulu økjast tey næstu árini soleiðis:

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. | Søla av upplýsingum og tænastum hjá Ílegusavninum | | 250 | 500 | 1.000 | 1.000 |

## 5. Heilivágsframleiðsluútflutningur

*Endamál*
Endamálið við hesum tiltakinum er at fíggja part av rakstrinum hjá Apoteksverkinum við at útflyta heilivág, sum er framleiddur í Føroyum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Framleiðsludeildin hjá Apoteksverkinum verður væntandi liðug at taka í nýtslu í 2013. Hetta gevur møguleika fyri framleiðslu undir altjóða góðkendum umstøðum. Eitt av málunum við umbyggingini av framleiðsludeildini hevur verið at fáa umstøður, soleiðis at heilivágur kann útflytast. Fyrispurningar hava verið úr Íslandi, Danmark og Noregi um at keypa heilivág, sum er framleiddur úr Føroyum. Væntað verður, at tað fer at taka nakað av tíð at byggja ein marknað upp. Upphæddirnar, sum eru nevndar í talvuni niðanfyri, eru nettoúrslit av átakinum. Starvsfólka- og tilfarsútreiðslur fara at vera í sambandi við hesa alternativu inntøkuna. Ein varislig meting er, at

nettoúrslitið kann byggjast upp árini frá 2015 til 2017 frá 500 tús. kr. í yvirskoti til 2 mió. kr. í yvirskoti.

*Avleiðingar*
Átakið hevur positivar avleiðingar fyri apoteksverkið, sum kann brúka sína vitan og framleiðslutøkni til at fíggja partar av rakstrarútreiðslunum.

*Gjøgnumførsla*
Ásetast kann í fíggjarlógini, at apoteksverkið skal hava hesa nettoinntøkuna av útflutningi av heilivági. Landsapotekarin fær ábyrgd av at skipa virksemið soleiðis, at málið verður rokkið.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. | Heilivágsframleiðslu útflutningur | 0 | 500 | 1.000 | 2.000 | 2.000 |

## 6. Alment innkeyp

*Endamál*
Nýggi almenni innkeypspolitikkurin skal føra við sær sparingar í almenna rakstrinum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Fíggjarliga avleiðingin er, at almenna útreiðslustøði lækkar, ætlandi uttan at tænastustøðið lækkar.

*Avleiðingar*
Útreiðslustøði hjá tí almenna lækkar.

*Verksetan*
Verður gjørt við nýggjum mannagongdum viðv. almennum innkeypi.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. | Alment innkeyp | 400 | 800 | 1.200 | 1.200 | 1.200 |

## § 12 Almannamál

Rakstrartiltøk árini 2014 til 2018 fyri § 11 Almannamál:

| **Talva A2.7: Tiltøk fyri § 12 Almannamál 2014-2018** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Tús. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
| **Framskrivað játtan** | 1.681.924 | 1.724.959 | 1.758.323 | 1.782.174 | 1.803.746 | 1.826.354 |
| **Tiltøk:** | | | | | | |
| 1. Fólkapensjón: Pensjónsnýskipan | | 0 | 0 | 25.200 | 31.500 | 37.800 |
| 2. Sparingar innan rakstrarjáttanir og sparing innanfyri Serforsorg | | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 3. Alment innkeyp | | 277 | 554 | 831 | 831 | 831 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **3.277** | **3.554** | **29.031** | **35.331** | **41.631** |
| **Játtan aftaná tiltøk** | | **1.721.682** | **1.754.769** | **1.753.143** | **1.768.415** | **1.784.723** |
| *Indeks* | | *102* | *104* | *104* | *105* | *106* |

Útgreinað einstøk tiltøk hjá § 12 Almannamál:

### 1. Fólkapensjón: Pensjónsnýskipan

*Endamál*
Í framtíðini verður talið á eldri fólki størri, samstundis sum talið av arbeiðsførum minkar. Hetta fer at seta pensjónsskipanina og vælferðartænasturnar undir stórt trýst, tí útreiðslurnar fara at vaksa munandi.

*Fíggjarlig ávirkan*
Tann fíggjarliga sparingin verður mett til 25,2 mió. kr. í 2016, 31,5 í 2017 og 37,8 mió. kr. í 2018.

*Avleiðingar*
Pensjónsbólkurin kemur at viðgera gjøllari, hvussu pensjónsviðurskiftini fyri hvønn einstaka borgara skulu síggja út í framtíðini. Spurningurin um javning verður tikin upp í pensjónsbólkinum við tí endamáli at fáa skipanina í trygga legu.

*Fremjan*
Lógaruppskot verða løgd fyri Tingið í heyst.

| **Nr.** | **Navn á tiltaki / Upphædd í mió. kr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Pensjónsnýskipan | 0 | 0 | 25.200 | 31.500 | 37.800 |

## 2. Sparingar innan rakstrarjáttanir og sparing innanfyri Serforsorg

*Endamál*
Gjørdar verða rationaliseringar í rakstrarjáttunum undir §12 Almannamál. Skipað eftirlit hevur verið seinastu árini við stovnsuppihald í Danmark. Eitt úrslit av hesum er, at tað tykist møguligt at fáa avtalu við kommunurnar í Danmark at broyta onkur av tilboðunum. Tiltøkini innanfyri Serforsorg fevna tískil um sparing á stovnsuppihaldi í Danmark, har talan er um nýggjan dagsprís, og nýtt kostnaðarminni tilboð um stuðul o.a.

*Fíggjarlig ávirkan*
Mett verður at umleið 1,5 mió. kr. kunnu sparast við tillagingum í rakstrarjáttanum, og umleið 1,5 mió.kr. kunnu sparast vegna lægri dagsprís og kostnaðarminni tilboð í 2014.

*Avleiðingar*
Kostnaðarminni umsiting. Málið um lægri dagsprís og kostnaðarminni tilboð má takast upp við kommunur í Danmark.

*Verksetan*
Krevur ikki lógarbroyting. Broyttur dagsprísur kann fremjast, tá málið er avklárað við kommunurnar.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í mió. kr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Sparingar innan rakstrarjáttanir og stovnsuppihaldi í Danmark hjá Serforsorg | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |

## 3. Alment innkeyp

*Endamál*
Nýggi almenni innkeypspolitikkurin skal hava við sær sparingar í almenna rakstrinum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Fíggjarliga avleiðingin er, at almenna útreiðslustøðið lækkar, ætlandi uttan at tænastustøðið lækkar.

*Avleiðingar*
Útreiðslustøðið hjá tí almenna lækkar.

*Verksetan*
Verður gjørt við nýggjum mannagongdum viðv. almennum innkeypi.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. | Alment innkeyp | 277 | 544 | 831 | 831 | 831 |

## § 15 Innlendismál

Rakstrartiltøk árini 2014 til 2018 fyri § 15 Innlendismál:

| **Talva A2.8: Tiltøk fyri § 15 Innlendismál 2014-2018** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Tús. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
| **Framskrivað játtan** | 105.525 | 102.620 | 104.070 | 102.020 | 101.920 | 101.820 |
| **Tiltøk:** | | | | | | |
| 1. Landsins ognir | | 1.100 | 1.120 | 1.170 | 1.170 | 1.170 |
| 2. Tiltøk innan rakstur og stuðul | | 220 | 1.170 | 2.020 | 2.020 | 2.020 |
| 3. Alment innkeyp | | 759 | 1.518 | 2.277 | 2.277 | 2.277 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **2.079** | **3.808** | **5.467** | **5.467** | **5.467** |
| **Játtan aftaná tiltøk** | | **100.541** | **100.262** | **96.553** | **96.453** | **96.353** |
| *Indeks* | | *95* | *95* | *91* | *91* | *91* |

Útgreinað einstøk tiltøk á § 15 innlendismál:

### 1. Landsins ognir

*Endamál*
Útreiðslan til ognirnar hjá verjuni í Føroyum eru brutto 2,1 mió. kr. meðan inntøkur eru fyri 1 mió. kr. Onnur milliónin í inntøkum skal vera nøktandi til at bera rakstrarútreiðslurnar, meðan viðlíkahaldið skal røkjast av 15.11.1.56. Umvæling av almennum bygningum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Avleiðingin er 1,1 mió. kr. árliga.

*Avleiðingar*
Viðlíkahaldið av ognunum , ið verjan átti, skal fíggjast av 15.1.56. Umvæling av almennum bygningum.

*Verksetan*
Verður gjørt við tillagingum av rakstrinum.

| **Nr.** | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Landsins ognir | 1.100 | 1.120 | 1.170 | 1.170 | 1.170 |

## 2. Tillagingar í rakstri og stuðlum

*Endamál*
Spart og tillagað verður í virkseminum fyri 220 tús. kr.í 2014,vaksandi til góðar 2 mió. kr. í 2016.

*Avleiðingar*
Virksemið á § 15 Innlendismálaráðið minkar í 2014 og fram.

*Verksetan*
Verður gjørt við tillagingum av rakstri og stuðlum.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Tillagingar í rakstri og stuðlum | 220 | 1.170 | 2.020 | 2.020 | 2.020 |

## 3. Alment innkeyp

*Endamál*
Nýggi almenni innkeypspolitikkurin skal hava við sær sparingar í almenna rakstrinum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Fíggjarliga avleiðingin er, at almenna útreiðslustøðið lækkar, ætlandi uttan at tænastustøðið lækkar.

*Avleiðingar*
Útreiðslustøðið hjá tí almenna lækkar.

*Verksetan*
Verður gjørt við nýggjum mannagongdum viðv. almennum innkeypi.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. | Alment innkeyp | 759 | 1.518 | 2.277 | 2.277 | 2.277 |

## § 20 Inntøkur

Tiltøk árini 2014 til 2018 fyri § 20 Inntøkur eru (í mió. kr.):

**Talva A2.9: Tiltøk fyri § 20 Inntøkur 2014-2018**

| *Mió. kr.* | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Framskrivað játtan** | 4.414 | 4.441 | 4.488 | 4.580 | 4.680 | 4.785 |
| **Tiltøk:** | | | | | | |
| 1. Eykaskattur á fiski- og alivinnu | | 145 | 145 | 145 | 145 | 145 |
| 2. Hægri fráfaringaraldur | | 2 | 3 | 4 | 5 | 5 |
| 3. Bøtur | | 5 | 5 | 5 | 5 | 5 |
| 4. Heildarveiting | | 9 | 17 | 26 | 26 | 26 |
| **Tiltøk tilsamans** | | **160** | **170** | **180** | **180** | **180** |
| **Játtan aftaná tiltøk** | | **4.601** | **4.658** | **4.760** | **4.860** | **4.965** |
| *Indeks* | | *104* | *106* | *108* | *110* | *112* |

Útgreinað einstøk tiltøk á § 20 inntøkur:

### 1. Eykaskattur á fiski- og alivinnu

*Endamál*
Skapast skulu tryggir karmar fyri alla tilfeingisvinnu. Meðan alivinnan hevur fingið rættiliga tryggar karmar at arbeiða undir, er óvissan um framtíðar arbeiðstreytirnar hjá fiskivinnuni alt ov stór. Landsstýrið ásannar, at tryggir vinnuligir karmar er ein avgerandi fyritreyt fyri búskaparligum vøkstri. Tí arbeiðir Landsstýrið við at evna uppskot til, ið gevur vinnuni brúksrættindi til tilfeingið. Á hendan hátt verður spurningurin um gildistíð hjá fiskivinnuni í sambandi við 2018 avgreiddur og lagdur í fasta legu.

Sum integreraður partur av tilgongdini at umskipa fiskivinnuna er avgjørt, at eykaskattur verður lagdur á fiski- og alivinnu á 145 mió. kr. tilsamans við verandi inntøkustøði í vinnunum, har serligur vinningur (tilfeingisrenta) verður skattaður. Gjaldið skal ikki virka destabiliserandi fyri vinnuna, t.e. tá vinnan hevur lítið yvirskot, skal gjaldast minni til Landskassan, meðan tá vinnan hevur stórt yvirskot, skal gjaldast meira. Hvussu stóran part fiskivinnan ber í mun til alivinnuna, verður tí alt eftir úrslitinum frameftir.

Arbeiðsbólkur við luttøku frá Fíggjarmálaráðnum, Fiskimálaráðnum og Vinnumálaráðnum er settur at gera uppskot til nýggja skipan, og ætlar landsstýrið at leggja uppskot til nýggja skipan fyri Løgtingið saman við fíggjarlógaruppskotinum í heyst.

*Fíggjarlig ávirkan*
Eydnast at fáa optimalar karmar fyri tilfeingisvinnuna, ber til at fáa størri part av tilfeingisrentuni til høldar og búskaparvøksturin komandi árini verður størri. Landsstýrið metir, at Landskassans partur

av tilfeingisrentuni í fiskivinnuni og alivinnuni árini 2014 – 2018 verður 145 mió kr. árliga. Alt eftir hvør skipan verður vald, kann verða neyðugt við skiftisskipan fyri 2014.

*Avleiðingar*
145 mió. kr. verður goldið til Landskassan av luttakarum í ali- og fiskivinnuni, við verandi inntøkustøði í vinnuni.

*Verksetan*
Arbeiðsbólkurin leggur uppskot til skipan fyri Landsstýrið í heyst, og leggur Landsstýrið ætlandi lógaruppskot fyri Løgtingið í heyst saman við fíggjarlógini.

| **Nr.** | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Eykaskattur á fiski- og alivinnu | 145.000 | 145.000 | 145.000 | 145.000 | 145.000 |

## 2. Hægri fráfaringaraldur hjá landinum

*Endamál*
At økja um arbeiðsútboðið og minka um pensjónsútreiðslur landsins.

*Lýsing*
Sum er, skulu almenn starvsfólk hjá landinum frá, tá ið tey gerast 70 ár. Um henda áseting verður broytt, kann hugsast, at fleiri fara at halda fram at arbeiða eftir 70 ára aldur. Hetta hevði havt við sær økt arbeiðsútboð, og harvið eisini hægri skattainntøkur. Eisini hevði Landskassin spart útreiðslur til fólkapensjón, tí at tey, sum halda fram at arbeiða, missa viðbót til fólkapensjónina.

Ætlanin er tó ikki at geva øllum rætt til at halda fram. Hetta skal verða treytað av, at viðkomandi fær viðmæli frá stovnsleiðarara ella næsta fyrisetta. Skotið verður upp, at loyvi verður givið fyri tvey ár í senn, soleiðis at meting fer fram annaðhvørt ár, um viðkomandi framvegis er egnaður til starvið.

*Avleiðingar*
Hægri landsskattainntøkur, lækking í útreiðslum til fólkapensjón og størri arbeiðsstyrki.

*Fíggjarlig ávirkan*
Fíggjarliga avleiðingin í 2014 er áleið 1,8 mió. kr., men hækkar síðani upp í 4,5 mió. kr. Roknað verður við fullari effekt frá 2017.

*Verksetan*
Verður framt við broyting í "Rundskriv um fráfaringaraldur" og fyri tænastumenn við broyting í tænastumannalógini.

| **Nr.** | **Navn á tiltaki / Upphædd í tkr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. | Hægri fráfaringaraldur hjá landinum | **1.800** | **3.150** | **4.050** | **4.500** | **4.500** |

## 3. Bøtur

*Endamál*
Bøtur í Føroyum skulu í Landskassan heldur enn statskassan.

*Fíggjarlig ávirkan*
Landskassin fær fíggjarliga ágóðan av bøtum.

*Verksetan*
Loysn skal finnast á málið saman við donsku stjórnini.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. | Bøtur | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |

## 4. Heildarveiting

*Lýsing*
Landsstýrið hevur valt at samráðast um 3 ára avtalu við donsku stjórnina, ið hevur við sær, at heildarveitingin verður prísjavnað árliga komandi 3 árini.

*Fíggjarlig ávirkan*
Roknað verður við árligari javning á umleið 8,5 mió. kr. árliga komandi 3 árini, ella tilsamans 25,5 mió. kr.

*Verksetan*
Avtala skal gerast við donsku stjórnina.

| Nr. | Navn á tiltaki / Upphædd í tkr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. | Heildarveiting | 8.500 | 17.000 | 25.500 | 25.500 | 25.500 |

## APPENDIKS 3: Løgur 2014-2024

Talvan niðanfyri vísir løguætlan landsstýrisins frá 2014 til 2024, umframt samtyktar løgujáttanir fyri 2013. Løgur fyri 258,5 mió. kr. skulu eftir ætlan fremjast í 2013. Í 2014 verður løgukarmurin hækkaður til 323 mió. kr Í 2015 verður løgukarmurin 298,9 mió. kr. og í 2016 253,4 mió. kr.

Niðanfyri eru løgurnar árini 2014-2024 á einstaku greinunum viðgjørt.

**§ 1 Løgtingið**

Eingin løgutiltøk eru fyri greinina.

**§ 2 Løgmansfyrisitingin**

3,0 mió. kr. verða avsettar til umbygging í Tinganesi. Umbyggingin tekur støði í ”Heildarætlan fyri Tinganes”, ið gjørd varð fyri nøkrum árum síðani.

**§ 3 Fíggjarmálaráðið**

Eingin tiltøk eru ásett fyri greinina í 2014. Í 2019-2021 er ætlanin at gera stórumvæling av bygninginum hjá Fíggjarmálaráðnum á Argjum.

**§ 5 Fiskivinnumál**

Eingi tiltøk eru ásett fyri greinina.

**§ 6 Vinnumál**

Í 2014 verða 21,4 mió. kr. játtaðar til løgur innan Strandfaraskip Landsins. Av upphæddini hjá Strandferðsluni til dokking verða 12 mió. kr. í 2015 og og 10 mió. kr. í 2017. Viðmerkjast skal, at krøvini til dokking verða herd, tá Smyril er vorðin 10 ár í 2015, og skal skipið tá í dokk annað hvørt ár, heldur enn triðja hvørt ár sum higartil. Umframt Smyril fer játtaða upphæddin til dokking og størri viðlíkahald av smærru skipunum hjá Strandferðsluni.

Settar verða 20 mió. kr. í 2014 og 22,5 mió. kr. í 2015 til bygging av nýggjum nólsoyarskipi. Í upphæddini er íroknað prosjektering.

**§ 7 Mentamálaráðið**

*Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoynni*: Á fíggjarlógini 2013 vórðu játtaðar 12 mió.kr. til at fyrireika eina um- og útbygging av miðnámsskúlunum á Kambsdali í 2013 og 2014. Bygginevnd hevur gjørt byggiskrá og lýst hølistørvin. Endamálið við útbyggingini er at nøkta hølistørvin og tryggja næmingum og lærarum nútímans námsfrøðiligar karmar. Verklagslóg er samtykt í mars í 2013. Verklagslógin ásetur, at byggjast kunnu fyri í mesta lagi 28,0 mió. kr. íroknað prosjektering og innbúgv. Farið verður nú undir at prosjektera og byggja út.

*Tekniski Skúli í Klaksvík*: Á fíggjarlógini 2013 vórðu 10 mió.kr. játtaðar til at fyrireika eina útbygging av Tekniska Skúla í Klaksvík. Útbyggingin skal fevna um høli til matvøruútbúgvingina á skúlanum. Ætlanin er eisini at byggja skúlan út, soleiðis at HF-deildin í Klaksvík í framtíðini kann húsast á Tekniska Skúla, og er endamálið at tryggja næmingum og lærarum nútímans námsfrøðiligar karmar. Byggiskrá varð gjørd á heysti í 2012. Projekteringsarbeiðið byrjaði fyrst í januar í 2013 og ætlanin er at lisitatiónin verður fyri ólavsøku í ár. Farið verður undir at byggja í heyst. Verklagslógin sigur, at byggikostnaðurin kann í mesta lagi vera 36 mió. kr.

*Skúladepil við Marknagil*: Spakin verður settur í hálvan apríl. Síðan verður farið undir at byggja Skúladepilin við Marknagil. Skúladepilin skal hýsa virkseminum hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, Tekniska Skúla og Føroya Handilsskúla í Tórshavn.
Verklagslóg, ið ásetur ein samlaðan byggikostnað við innbúgvi á 515 mió. kr. er samtykt á Løgtingi. Ætlanin er at næmingar og lærarar skulu flyta inn í nýggja skúladepilin á sumri í 2016.

*Tjóðleikhús*: Hølisumstøðurnar hjá Tjóðpalli Føroya eru út av lagi vánaligar. Á løgtingsfíggjarlógini 2011 vórðu játtaðar 5 mió. kr., sum eru støðlaðar fram til 2013 at fyrireika bygging av tjóðleikhúsi fyri.
Haraftrat eru settar av 45 mió.kr. á langtíðarløguætlanini. Bygginevnd ger í 2013 byggiskrá, ið skal lýsa hølistørvin, og sum kann verða grundarlag fyri projektering av byggiverkætlanini.

*Víðkað tilboð til ung við serligum tørvi*: Mentamálaráðið tók stig til at seta Rásina í Runavík á stovn í 2003 sum eitt skúlatilboð til ung við serligum tørvi. Endamálið við skúlatilboðnum er at menna tey ungu til eitt sjálvstøðugt lív eftir lokið skúlaskeið. Hvørt skúlaskeiðið er í mesta lagi 3 ár. Ætlanin er at víðka hetta skúlatilboðið við einum skúla aftrat fyri at nøkta vaksandi tørvin.

*Húsarhaldsskúli*: Ætlanin er at byggja ein nýggjan húsarhaldsskúla. Húsarhaldsskúlin virkar partvíst sum ein eftirskúli. Ætlanin við hesi íløgu er at bøta um verandi hølis- og íbúðarviðurskifti og tryggja næmingum og lærarum nútímans námsfrøðiligar karmar.

*Hvalastøðin við Áir*: Játtanin er til framhaldandi varðveitingararbeiði í sambandi við Hvalastøðina við Áir.

*Kirkjubømúrurin*: Játtanin er til framhaldandi varðveitingararbeiði í sambandi við Kirkjubømúrin.

*Søvn Landsins*: Játtanin er ætlað til at byggja hóskandi hølir til virksemið hjá Søvnum Landsins.

**§ 11 Heilsumálaráðið**

*Apoteksverkið*: Í 2013 vórðu 5,8 mió. kr. játtaðar til at gera verkætlanina hjá Apoteksverkinum á Staravegi lidna. Samsvarandi verklagslógini eru sostatt árini 2012 og 2013 játtaðar 26 mió. kr. til endamálið.

*Medicoteknisk tól*: Fyri at halda tólaútbúnaðin á einum jøvnum stigi er umráðandi, at hann regluliga verður endurnýggjaður. Játtaðar verða 9 mió. kr. um árið frameftir.

*Landssjúkrahúsið*: Løgujáttanin til Landssjúkrahúsið verður nýtt samsvarandi verklagslógini (løgtingslóg nr. 77 frá 7. juni 2011 um broyting í løgtingslóg um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið). Harafturat hevur Landsstýrið valt at fremja munandi íløgur 2017-2020.

*Klaksvíkar sjúkrahús*: Játtanarupphæddirnar árini 2012-2014 svara til verklagslógina (løgtingslóg nr. 23 frá 16. mars 2012 um at umbyggja og umvæla Klaksvíkar sjúkrahús), við tillagingum, tí øll játtanarupphæddin í 2012 bleiv ikki brúkt.

*Suðuroyar sjúkrahús*: Við fíggjarætlanini fyri 2013 verður roknað við, at arbeiðið at nútíðargera starvsfólkabygningin hjá sjúkrahúsinum, sum er frá fyrst í fimmtiárunum, verður liðugt.

**§ 12 Almannamálaráðið**

Landsstýriskvinnan hevur ætlanir um at byggja eitt ungdómspensjonat sum liður í, at børn og ung, ið hava fyri neyðini at fáa serliga viðgerð á stovni, kunnu verða verandi í Føroyum. Harumframt er ungdómspensjónatið ætlað til teirra, sum hava verið á stovnum í Føroyum, og sum hava tørv fyri at fáa eitt tilboð, har tey kunna búnast til vaksnamannalívið. Ungdómspensjonatið skal eisini nýtast til at taka ímóti teimum, sum koma heim aftur eftir lokna viðgerð uttanlands.

Harumframt er ætlanin at byggja ein virknis- og umlættingardepil í Sandoynni, soleiðis at tað ber til hava eitt miðvíst tilboð til fleiri børn og ung.

Í 2014 verða 37,3 mió. kr. játtaðar til Bústovnar. Hildið verður fram vit at byggja vardar bústaðir í Norðoyggjum og Eysturoy og sambýli í Tórshavn fyri sálarsjúk. Byrjað verður uppá at byggja virknis- og umlættingardepilin í Sandoynni fyri børn og ung og eitt ungdómspensjonat.

Í 2015 verða 14,3 mió. kr. brúktar til Bústovnar. Ungdómspensjonatið og virknis- og umlættingardepilin í Sandoynni verða liðugt bygdir.

Í 2016 verða 0,5 mió. kr. játtaðar til Bústovnar. Upphæddin skal brúkast til fyrireiking av stovni fyri heilaskadd.

Í 2017 verða 7,0 mió. kr. játtaðar til Bústovnar. Farið verður undir bygging av stovni fyri heilaskadd.

Í 2018 verða 5,0 mió. kr. brúktar til Bústovnar. Stovnur fyri heilaskadd verður liðugt bygdur og samstundis verður verandi stovnur, sum brúktur er til endamálið, seldur. Farið verður undir fyrireiking av sambýli til sálarsjúk.

Í 2019-2024 verða 65,1 mió. kr. játtaðar til Bústovnar. Ætlanin er at byggja tvey sambýli til menningartarnað og eitt sambýli til fólk við sálarsjúku. Talan er um at nútímansgera verandi bústaðir.

**§ 15 Innlendismál**

**Landsins bygningar:** til umvæling av almennum bygningum verða 26,5 mió. kr. játtaðar í 2014 , og síðan 25 mió. kr. árliga.

**Landsvegir: til dagføring av brúm** og tunlum verða 4,0 mió. kr. játtaðar í 2014. Játtanin hækkar til 5,0 mió kr. í 2019, og síðan til 10,0 mió kr. í 2022. Sera stórur tørvur er á játtanum.

**Vegurin omanfyri Skálafjørð** verður raðfestur árini 2018-2021 fyri 50 mió. kr. Nýggjur vegur er gjørdur millum Skála og Strendur. Eftir er farleiðing um Skálafjørð, har ein umkoyringarvegur skal gerast um bygdina Skálabotn, sum verður bundin í landsvegin Millum Fjarða.

**Innkoyringarvegur til Havnar**. Tað verða eftir ætlan játtaðar 94 mió kr. samanlagt til innkoyringarvegin í tíðarskeiðinum 2018- 2020. Sera nógv ferðsla er á Kalbaksvegum, og er tørvur á at leiða ferðsluna uttanum bygt øki. Eisini havandi í huga øktu ferðsluna í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Til trygdartiltøk** verða 6,0 mió. kr. játtaðar árlig. Frá 2021 verður játtanin hækkað til 10,0 mió kr.

**Farleið til Dals** byrjar í 2016 og endar í 2022. Eftir ætlan verða 45,5 mió. kr. brúktar.

**Til Farleið til Fámjins**, verða 70 mió kr. játtaðar í tíðarskeiðinum 2022-2024. Verandi farleið kann dagførast, ella tunnil gerast.

**Til tunlar Norður um Fjall**, verða 265 mió kr. játtaðar í tíðarskeiðinum 2021-2024. Verandi tunlar eru einbreytaðir og ein forðing fyri vinnulívi og útbygging norðan fyri teir. Eftir ætlan verða tveir nýggir tunlar gjørdir.

**Til at tryggja Tjørnuvíkarvegin**, verða 25 mió kr. játtaðar í tíðarskeiðinum 2018 – 2024. Vegurin verður dagførdur, og trygdarhegn sett upp.

**Tunnil millum Gøtudal/Kambsdal og Skálafjørð** verður gjørdur árini 2021-2024 fyri 122 mió. kr. Endamálið at er stytta nakað um farleiðina, koyra ferðsluna uttanum Gøtueiði, sum liggur høgt, og minka ferðsluna gjøgnum bygda økið við Gøtugjógv.

**Til vegagerð í Kalsoy**, vegir og tunlar, verða 2,0 mió. kr. játtaðar í 2013, og millum 2 og 3 mió. kr. árliga fram til 2019.

**Hvalbiartunnilin** verður raðfestur árini 2018-2021 fyri 165 mió. kr. Tunnilin millum Hvalba og Trongisvág, er elsti tunnil í Føroyum. Tørvur er á at gera eina hóskandi farleið. Ætlanin er at gera nýggjan tunnil, við nýggjum vegum báðumegin tunnilin.

**Inni í Firði, Kollafjørður**. Eftir ætlan verða 27,0 mió kr. játtaðar til verkætlanina í tíðarskeiðinum 2019 – 2021. Inni í Firði fer verandi landsvegur ígjøgnum bygt øki, har sera nógv ferðsla er. Ætlanin er at gera landsveg omanfyri bygda økið inni í Firði, umleið 2 km.

**Millum Fjarða - Funningsfjørð**. Tað verða játtaðar samanlagt 10,0 mió kr. til endamálið í 2017 – 2018. Vegurin er ov smalur, og ikki bygdur til ferðsluna í dag. Peningur verður settur av til at breiðka vegin.

**Ferðsluætlan, Vágar**. Tað verða játtaðar 15,0 mió kr. til endamálið í tíðarskeiðinum 2014-2017. Játtanin verður brúkt til ymisk tiltøk sambært ferðslutrygdarætlanini fyri Sandavág, Miðvág og Sørvág, sum eru gjørdar í samstarvi millum kommunurnar í Vágum og Landsverk.

**Til umkoyringarveg í Søldafirði**, verða 75,5 mió játtaðar í tíðarskeiðinum 2014-2022. Verkætlanin snýr seg um at føra landsvegin á eystara armi á Skálafjørðinum, uttan um bygt øki í Søldafirði, við at leggja vegin omanfyri bygdina.

**Til tunnil til Viðareiðis**, verða 152,5 mió kr. játtaðar árini 2014-2017. Í 2012 og 2013, vóru 11,5 mió kr. játtaðar samanlagt. Til tess at tryggja eina hóskandi farleið til Viðareiðis, verður tunnil bygdur millum Hvannasund og Middal, og tilhoyrandi vegir gjørdir.

**Til vegagerð í Oyrunum, Toftir**, verður 1,0 mió kr. játtað í 2014. Í 2013 vóru 3 mió kr. játtaðar. Ein rundkoyring verður gjørd við niðankoyringina til Svangaskarð, við møguleika fyri kommunalari íbinding til havnalagið á Oyruni.

**Til farleið til Vestmanna** verða 20,0 mió kr. settar av í 2021 – 2024 til tunnil. Í samferðsluætlanin verður víst á ymiskar møguleikar.

**Til strekkið Undir Valaknúkum, undir Gøtueiði**, verða til 7,0 mió kr. játtaðar í 2014, til at breiðka og dagføra vegastrekkið. Í 2013 vóru 3,0 mió kr. játtaðar.

**Eysturoyartunnilin**. Til fyrireiking til útbjóðing av Eysturoyartunlinum verða 6,0 mió. kr. játtaðar í 2014. Sama upphædd var játtað í 2013. Felagið sum fær konsessiónina endurrindar kostnaðin.

**Til Sandoyartunnil** verða 5 mió. kr. settar av í 2014 og í 2015. Síðan hækkar játtanin til 25,0 mió kr. í 2016, og til 35 mió kr. í 2017. Í 2020- 2024, hækkar játtanin til 50,0 mió kr. Samanlagt 390 mió kr. í tíðarskeiðinum 2014 – 2024. Endamálið er at fyrireika og byggja Sandoyartunnilin.

**Havnir**
Til smáábøtur á landsins samferðsluhavnir og ferjulegur, verða 2,2 mió. kr. játtaðar árliga fram til 2016.

| Talva A3.1: Langtíðarløguætlan 2013-2024 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Mió. kr.** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
| **§ 2 Løgmansfyrisitingin** | | | | | |
| Umbygging í Tinganesi | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **§ 2 tilsamans** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** |
| **§ 3 Fíggjarmálaráðið** | | | | | |
| Flyting av fíggjar- og búskaparstovnum landsins | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§ 3 tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **§ 6 Vinnumálaráðið** | | | | | |
| SSL - dokking v.m. | 1.400 | 12.000 | 1.000 | 10.000 | 0 |
| SSL - nýtt skip | 20.000 | 22.500 | 0 | 0 | 0 |
| **§ 6 tilsamans** | **21.400** | **34.500** | **1.000** | **10.000** | **0** |
| **§ 7 Mentamálaráðið** | | | | | |
| Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy | 16.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 10.000 | 12.000 | 0 | 0 | 0 |
| Skúladepil við Marknagil | 85.000 | 95.000 | 168.500 | 0 | 0 |
| Søla av bygningum | 0 | 0 | -60.000 | 0 | 0 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tjóðleikhús | 0 | 0 | 0 | 3.000 | 13.500 |
| Víðkað tilboð til børn og ung við serligum tørvi | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Húsarhaldsskúli | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Hvalastøðin við Áir | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 0 | 0 |
| Kirkjubømúrurin | 1.000 | 1.000 | 0 | 0 | 0 |
| Søvn Landsins | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§ 7 tilsamans** | **113.000** | **109.000** | **109.500** | **3.000** | **13.500** |
| **§ 11 Heilsumálaráðið** | | | | | |
| Apoteksverkið, Staravegur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Medicoteknisk tól | 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 |
| Landssjúkrahúsið | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 140.000 | 130.000 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 5.000 | 1.000 | 0 | 0 | 0 |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§ 11 tilsamans** | **44.000** | **40.000** | **39.000** | **149.000** | **139.000** |

| 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** |
| | | | | | |
| 500 | 10.500 | 10.500 | 0 | 0 | 0 |
| **500** | **10.500** | **10.500** | **0** | **0** | **0** |
| | | | | | |
| 14.800 | 1.500 | 14.000 | 0 | 13.000 | 800 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **14.800** | **1.500** | **14.000** | **0** | **13.000** | **800** |
| | | | | | |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 5.000 | 13.000 | 13.000 | 17.000 | 7.150 |
| 28.500 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5.000 | 10.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 2.500 | 14.000 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 6.400 | 12.250 | 13.000 | 17.400 | 0 |
| **33.500** | **21.400** | **25.250** | **26.000** | **36.900** | **21.150** |
| | | | | | |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 |
| 52.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **61.000** | **9.000** | **9.000** | **9.000** | **9.000** | **9.000** |

| Mió. kr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 12 Almannamálaráðið** | | | | | |
| **Sambýlið fyri sálarsjúk Tórshavn** | 2.700 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ellis- og røktarheimið í Vágum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Stovnur fyri heilaskadd | 0 | 0 | 500 | 7.000 | 7.000 |
| Selja verandi hús | 0 | 0 | 0 | 0 | -2.500 |
| Vardir bústaðir í Eysturoynni í Norðoyggjum | 20.300 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Depil í Eysturoynni til fjølbrekaði | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ungdómspensjónat | 8.300 | 8.300 | 0 | 0 | 0 |
| Sjálvsognarstovnurin Sambýlir (avtøka) | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Sambýli til menningartarnað í Tórshavn | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Sambýli til fólk við sálarsjúku | 0 | 0 | 0 | 0 | 500 |
| Sambýli til autistar og menningartarnað í Sandoy | 5.950 | 5.950 | 0 | 0 | 0 |
| Sambýli til menningartarnað | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Dugni-Skúlin við Áir | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§ 12 tilsamans** | **37.250** | **14.250** | **500** | **7.000** | **5.000** |

| 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 1.000 | 12.500 | 8.500 |
| 10.650 | 10.650 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 500 | 10.650 | 10.650 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **10.650** | **10.650** | **0** | **1.500** | **23.150** | **19.150** |

| Mió. kr. | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 15 Innlendismálaráðið** | | | | | |
| Umvæling av almennum bygningum | 26.500 | 25.000 | 25.000 | 25.000 | 25.000 |
| Umhvørvisstovan | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Akstovan | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **26.500** | **25.000** | **25.000** | **25.000** | **25.000** |
| | | | | | |
| **Nýggir landsvegir** | | | | | |
| Dagføring av brúm, tunlum og vegum | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| Vegurin oman fyri Skálafjørð | 0 | 0 | 0 | 0 | 10.000 |
| Innkoyring, Havnin íbinding | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Innkoyringarvegur, Klingran -Skarðshjalli | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Innkoyringarvegur, Klingran Krákugjógv | 0 | 0 | 0 | 0 | 16.000 |
| Trygdartiltøk | 6.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 |
| Farleiðs til Dals, tryggja verandi veg | 0 | 0 | 2.000 | 2.000 | 7.500 |
| Farleiðs til Fámijins, veg og stuttan tunnil | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tunlar norður um Fjall | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tjørnuvíkuvegurin, tryggjan | 0 | 0 | 0 | 0 | 2.000 |
| Tunnil Gøtudal/Kambsdalur - Skálafjørður | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vegagerð í Kallsoy, vegir og tunlar | 3.000 | 2.000 | 3.000 | 3.000 | 2.000 |
| Hvalbiartunnilin | 0 | 0 | 0 | 0 | 10.000 |
| Inni í Firði, Kollafjørður | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Millum Fjarða til Funningsfjørð | 0 | 0 | 0 | 5.000 | 5.000 |
| Ferðsluætlan Vágar | 5.000 | 4.000 | 4.000 | 2.000 | 0 |
| Dagføring av Leirvíkar - Kollafjarðartunnilinum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Søla av jørð til kommunur | -100 | -100 | -100 | -100 | -100 |
| Søldarfjørður, umkoyringarvegur | 1.000 | 3.500 | 5.000 | 5.000 | 5.500 |
| Tunnil til Viðareiðis | 37.500 | 46.500 | 36.500 | 32.000 | 0 |
| Í oyrunum - Toftir | 1.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Farleið til Vestmanna | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Undir Valaknúkum - Undir Gøtueiði, breiðkan | 7.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Nýggir landsvegir tilsamans** | **64.400** | **65.900** | **60.400** | **58.900** | **67.900** |
| Havnir | 2.200 | 2.200 | 2.000 | 0 | 0 |
| | | | | | |
| **Undirsjóartunnlar** | | | | | |
| Sandoyartunnilin | 5.000 | 5.000 | 25.000 | 35.000 | 35.000 |
| Skálafjarðartunnilin, fyrireiking til útbjóðing | 6.000 | 0 | -12.000 | 0 | 0 |
| **Undirsjóartunnlar samanlagt** | **11.000** | **5.000** | **13.000** | **35.000** | **35.000** |
| **§ 15 tilsamans** | **104.100** | **98.100** | **100.400** | **118.900** | **127.900** |
| | | | | | |
| **Løgur § 1 - § 15 tilsamans** | **322.750** | **298.850** | **253.400** | **290.900** | **288.400** |
| *Indeks* | *125* | *116* | *98* | *113* | *112* |

| 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| 25.000 | 25.000 | 25.000 | 25.000 | 25.000 | 25.000 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **25.000** | **25.000** | **25.000** | **25.000** | **25.000** | **25.000** |
| | | | | | |
| 5.000 | 5.000 | 5.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| 10.000 | 25.000 | 5.000 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 20.000 | 42.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 16.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6.000 | 6.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 0 |
| 8.000 | 10.000 | 10.000 | 6.000 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 1.000 | 40.000 | 29.000 |
| 0 | 0 | 55.000 | 115.000 | 55.000 | 40.000 |
| 3.000 | 3.000 | 3.000 | 4.500 | 4.000 | 5.500 |
| 0 | 0 | 1.000 | 10.000 | 25.000 | 86.000 |
| 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 61.500 | 52.500 | 41.000 | 0 | 0 | 0 |
| 4.000 | 10.000 | 13.000 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 10.000 | 15.000 | 25.000 | 0 | 0 |
| -100 | -100 | -100 | -100 | -100 | -100 |
| 5.500 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **140.900** | **163.400** | **162.900** | **186.400** | **148.900** | **175.400** |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | | | | | |
| 35.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **35.000** | **50.000** | **50.000** | **50.000** | **50.000** | **50.000** |
| **200.900** | **238.400** | **237.900** | **261.400** | **223.900** | **250.400** |
| | | | | | |
| **324.350** | **294.450** | **299.650** | **300.900** | **308.950** | **303.500** |
| *126* | *114* | *116* | *117* | *120* | *118* |